Álit um Apoteksverkið
í framtíðini

SNIÐGIVIÐ, UMBROTIÐ, PRENTAÐ OG LIÐUGTGJØRT
PF. FØROYAPRENT . TEL 314 555

Álit um Apoteksverkið í framtíðini




# Álit um
# Apoteksverkið í framtíðini

# Álit um Apoteksverkið í framtíðini

# Álit um Apoteksverkið í framtíðini

**Apoteksverkið**
**2006**

**Arbeiðsbólkur**
Heri Mørkøre, landsapotekari, formaður
Turid Arge, deildarstjóri, Almanna- og heilsumálaráðið
Einar Magnússon, skrivstovustjóri í íslendska Heilsu- og trygdarmálaráðnum
Birgit Vitalis Ottosen, fulltrúi, Fíggjarmálaráðið

**Álit um Apoteksverkið í framtíðini**

***Útgevari:***
- Apoteksverkið

***Útgivið:***
6. juli - 2006

***Myndir:***
- Per á Hædd
- Føroyaprent

***Sniðgivið, umbrótið, prentað og liðugtgjørt:***
- Føroyaprent

# 1. Innihaldsyvirlit


| | | |
|---|---|---|
| **1.** | **Innihaldsyvirlit** | **5** |
| **2.** | **Formæli** | **6** |
| **3.** | **Endamál** | **8** |
| 3.1 | Uppskot viðgjørt á landsstýrisfundi í september 2005 | 8 |
| 3.2 | Arbeiðssetningurin | 8 |
| 3.3 | Arbeiðsbólkurin samansettur av | 8 |
| 3.4 | Avmarkingar | 8 |
| 3.5 | Tíðarfreist | 8 |
| **4.** | **Greining av apoteksverkinum** | **9** |
| 4.1 | Stutt søguligt baksýni | 9 |
| 4.1.1 | Apotekaragrunnurin | 9 |
| 4.1.2 | Lóggávan í 1949 | 10 |
| 4.2 | Apoteksverkið í verandi skipan | 11 |
| 4.2.1 | Distributión av heilivági | 11 |
| 4.2.2 | Útbúgvingarkrøv til starvsfólk | 13 |
| 4.2.3 | Eftirlitsfunktión | 13 |
| 4.2.4 | Felags EDV-skipan til apoteksverkið | 13 |
| 4.2.5 | Kunning um heilivág | 14 |
| 4.2.6 | Veitingartrygd | 14 |
| 4.2.7 | Framleiðsla av heilivági | 14 |
| 4.2.8 | Hagtøl | 14 |
| **5.** | **Skipan av apotekunum í Føroyum og londunum kring okkum** | **16** |
| 5.1 | Danska/finska skipanin | 18 |
| 5.2 | Føroyska/svenska skipanin | 19 |
| 5.3 | Íslendska/norska skipanin | 21 |
| 5.4 | Bretska skipanin | 22 |
| **6.** | **Fíggjarligir frymlar fyri føroyska apoteksverkið** | **24** |
| 6.1 | Stutt lýsing hvussu apoteksverkið er skipað fíggjarliga nú | 24 |
| 6.2 | Á fíggjarlóg | 25 |
| 6.2.1 | Rakstrarjáttan | 25 |
| 6.2.2 | Landsfyritøka | 25 |
| 6.3 | Uttan fyri fíggjarlóg | 26 |
| 6.3.1 | Alment partafelag | 27 |
| 6.3.2 | Sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt | 28 |
| 6.4 | Einskiljing | 30 |
| 6.5 | Sjálvsognarstovnar/-grunnar | 31 |
| **7.** | **Umrøða og uppskot at skipa Apoteksverkið í framtíðini** | **32** |
| **8.** | **Uppskot um heilivágsætlan fyri Føroyar fram til 2015** | **34** |
| **9.** | **Tilmæli** | **41** |
| **10.** | **Skjalalisti** | **43** |
| **11.** | **Fylgiskjøl** | **44** |
| | **Viðmerkingar** | **48** |



# 2. Formæli

Tað er umráðandi, at eitt lítið samfelag sum Føroyar, ið landafrøðiliga er fjart frá øðrum londum og hevur væl skipað Apoteksverk. Umráðandi er eisini at hava eina ávísa framleiðslu av heilivági. Hetta er millum annað ein treyt fyri, at ávísar viðgerðir kunnu veitast í sjúkrahúsverkinum.

Apoteksverkið eigur stóran lut í føroyska heilsuverkinum, við at framleiða heilivág, fáa til vega heilivág, útflýggja heilivág og ráðgeva brúkarum og heilsustarvsfólki í nýtslu av heilivági. Alt bendir á, at ráðgeving er eitt øki sum fer at mennast í komandi tíð, bæði tí at kanningar aðrastaðni vísa, at nógvar innleggingar á sjúkrahús standast av, at heilivágur verður skeivt brúktur, og eisini tí at fleiri sløg av heilivági, sum fyrr hava verið forskriftarskyldug, eru at fáa í handkeypi. Annar týðandi lutur hjá Apoteksverkinum verður at menna framleiðslu av heilivági til útflutnings. Her er talan um heilivág, sum stórar heilivágsfyritøkur ikki síggja nakran handilsligan vinning í at framleiða, tí at nøgdin er so mikið lítil.

Tað hevur verið ein avbjóðing at arbeiða við uppskoti til landsstýrismannin um framtíðar Apoteksverk. Stórar broytingar eru farnar fram á apoteksøkinum í flestum londum kring okkum, síðani lógin í Føroyum seinast varð broytt.

Tað er tó ymiskt, hvussu apoteksvirksemi er skipað í hesum londum. Tí hevur verið áhugavert at kanna hesi viðurskifti og samstundis samanborið tey við føroysk viðurskifti, við tí í hyggju at koma við tilmæli til, hvussu vit framhaldandi skipa okkum á skilabestan hátt.

Fyrsta apotekið varð sett á stovn í Føroyum í 1883, og var líka til 1949 á privatum hondum. Í 1949 varð apotekið yvirtikið sum sermál, og gjørdi landsstýrið tað til almenna ogn.

Seinast arbeitt hevur verið við størri broytingum á økinum var í 1988. Tá varð nýggj løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág samtykt. Hon fekk gildi frá 1. januar 1989[1].

1 Ll.nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 8. mai 1991.

Bygnaðarliga hevur Apoteksverkið ment seg nógv hesi seinastu árini. Nú eru fýra apotek í Føroyum: Tjaldurs apotek í Tórshavn, Suðuroyar apotek á Tvøroyri, Norðoya apotek í Klaksvík og Eysturoyar apotek í Runavík. Gongur sum ætlað, verða, áðrenn langt um líður, fimm apotek, tí ætlanin er at lata upp apotek í Tórshavnar kommunu, uppi í Hoyvíkshaganum.

WHO[2] mælir øllum londum til at arbeiða við heilivágsætlan. Hetta hevur stóran týdning í arbeiðinum áhaldandi at betra um heilsustøðuna, fyribyrgja sjúkum, og yvirhøvur at verja heilsuna hjá borgaranum alt lívið. Arbeiðsbólkurin hevur tí eisini gjørt uppskot til eina heilivágsætlan fyri Føroyar.

Arbeiðsbólkurin er sannførdur um, at allir føroyingar framhaldandi vilja hava eitt vælvirkandi Apoteksverk, ið útvegar tann rætta heilivágin til tann rætta, í rættari tíð, á rættan hátt í tí rættu góðskuni og við rættari og neyðugari kunning.

2 WHO, World Health Organization, er serligi heilsustovnurin undir Sameindu Tjóða (ST). WHO varð stovnað 7. apríl 1948

Arbeiðsbólkurin er harumframt sannførdur um, at allir føroyingar framhaldandi vilja hava, at Apoteksverkið hevur neyðugan heilivág tøkan, tá á stendur, t.d. tá umfarsóttir taka seg upp.

Vit vóna, at hetta uppskotið fer at geva íblástur til eitt gott kjak um evnið, og at Apoteksverkið framvegis kann virka í eini skipan, sum framhaldandi stuðlar undir at menna verkið til gagns fyri alt samfelagið.

Vit veita fyrrverandi íslendska heilsumálaráðharranum, Jóni Kristjánssyni, hjartans tøkk fyri beinasemi at læna okkum serfrøðingin, Einar Magnússon, skrivstovustjóra í íslendska Heilbrigðis- og tryggingarmálaráðnum, at vera í nevndararbeiðinum.

Skrivaranum í arbeiðsbólkinum, Richard Schwartson, takka vit fyri íblástur í sambandi við arbeiðið at gera álitið.

*Heri Mørkøre, formaður.*

# 3. Endamál

### 3.1 Uppskot viðgjørt á landsstýrisfundi í september 2005

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum orðaði í juli 2005 eitt uppskot til arbeiðssetning til ein bólk, sum skal koma við einum uppskoti til, hvussu Apoteksverkið í framtíðini verður skipað. Í september 2005 varð uppskotið viðgjørt á landsstýrisfundi, og fekk landsstýrismaðurin undirtøku fyri at arbeiða víðari við málinum.



### 3.2 Arbeiðssetningurin

1. Gera neyvari lýsing um hvussu Apoteksverkið, undir hesum framleiðsla, søla og distributión av heilivági, virkar nú.
2. Lýsa fyrimunir og vansar við verandi skipan.
3. Lýsa, hvussu hetta økið er skipað í londunum uttanum okkum.
4. Lýsa fyrimunir og vansar við teimum skipanum, ið eru í hesum londum.
5. Umrøða hvørjir møguleikar eru at skipa poteksverkið, undir hesum framleiðslu, sølu og útbýting av heilivági framyvir.
6. Koma við tilmæli til landsstýrismannin um, hvussu Apoteksverkið verður skipað í framtíðini, við atliti at framleiðslu, sølu og útbýting. Tilmælið skal eisini lýsa bygnað, framtíðar fíggjarmynstur, v.m. Hetta merkir, at støða skal takast til, um tað skulu gerast serligar roknskaparligar treytir fyri virksemið alt eftir, hvørt talan er um vøru, ið Apoteksverkið hevur einkarætt til at framleiða, selja og distribuera, ella vøru í fullari kapping.
7. Orða uppskot til heilivágsætlan fyri Føroyar, ið fevnir um alt heilivágsøkið, keyp, framleiðslu, sølu, distributión, nýtslu, viðgerð, goymslu við meira, og hvørjar lógarbroytingar eru neyðugar.
8. Tilmælið skal vísa umsitingarligar og fíggjarligar avleiðingar fyri landið, og um neyðugt er við lógarbroytingum. Krevjast lógarbroytingar, skal eisini skiljast uppskot til tíðarætlan um, hvussu skjótt hetta skal setast í verk.

### 3.3 Arbeiðsbólkurin samansettur av

- Heri Mørkøre, landsapotekari, formaður
- Turid Arge, deildarstjóri, Almanna- og heilsumálaráðið
- Einar Magnússon, skrivstovustjóri í íslendska Heilsu- og trygdarmálaráðnum
- Birgit Vitalis Ottosen, fulltrúi, Fíggjarmálaráðið

### 3.4 Avmarkingar

Vit avmarka okkum frá at umrøða grunnaproblematikkin, og vísa í tí sambandi á grunnálitið frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001.

### 3.5 Tíðarfreist

Upprunaliga skuldi álitið verða latið landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum tann 1. mars 2006, men hetta hevur drigið nakað út, og verður nú latið úr hondum.

# 4. Greining av apoteksverkinum

### 4.1 Stutt søguligt baksýni[3]

Søgan um heilivág er javngomul við søguna hjá mannaættini. Fyrstu mentanirnar við skriftmáli vóru tær, sum mentust millum Eufrat og Tigris ár 3200-2000 fyri Kristi føðing.

Hesar mentanir hava latið eftir seg skrivligar keldur um heilivágsnýtslu, t.d. opium. Tær fyrstu skrivligu keldurnar um framleiðslu av heilivági stava úr Egyptalandi umleið ár 2500 fyri Kristi føðing.

Apoteksvirksemið er tí elligamalt. Fyrstu veruligu apotekini, vit vita um, vóru tey í Bagdad í 7. øld eftir Kristi føðing. Bagdad var tátíðar háborg fyri handli, mentan og vísindum.

Í 13. øld verður apoteksvirksemi fyrstu ferð meira skipað, tá ið kongurin á Sisiliu, Fríðrikur 2 av Hohenstaufen staðfestir, at virksemið hjá apotekarum skuldi verða undir myndugleikaeftirliti. Samstundis verður bannað læknum at reka apoteksvirksemi, og soleiðis verður arbeiðsbýtið millum læknar og apotekarar staðfest. Harumframt skuldu prísirnir á heilivági verða undir myndugleikaeftirliti. Tað sama er mest sum framvegis galdandi á okkara døgum.

Fyrsta apotekið í Norðurlondum var kongaliga Hof-apotekið í Stockholm í Svøríki, sum byrjaði virksemi sítt miðskeiðis í 14. øld.

Frá tí at fyrsta apotekið varð sett á stovn í Føroyum í 1883 og inntil 1949, vóru apotekini á privatum hondum. Í lóg nr. 121 frá 29. apríl 1913 „om apotekervæsenet på Færøerne" er ásett, at slíkt virksemi kravdi kongligt loyvi. Tann 27. juli 1913 læt Tjalldurs Apotek upp við tílíkum kongligum loyvi.

Í 1949 gjørdist apotekið almenn ogn. Landsstýrið boðaði í skrivi, dagfest 1. juli 1949, danska heilsustýrinum frá, at nú málsøki apotek er yvirtikið sum sermál, verða broytingar gjørdar í apoteksverkinum. Í brævinum verður millum annað sagt: *„Landsstyret står økonomisk ansvarlig overfor apotekets drift, ligesom landsstyret sørger for lokaler, medens apotekeren skal have det tekniske, faglige og arbejdsmæssige ansvar. Hele det underordnede personale antages af ham, medens apotekeren ansættes af landsstyret".*

Í sambandi við yvirtøkuna vórðu ognirnar hjá apotekinum, vørugoymsla v.m., keypt frá fráfarandi privata apotekaranum. Apoteksbygningurin varð keyptur frá Christian Restorff.

Nýggj lóggáva varð sett í verk í 1949 við løgtingslóg nr. 14 frá 28. mars 1949 um apotek og løgtingslóg nr. 63 frá 16. desember 1949 um apotekaragrunn o.a.

3 „Er nakað grøðandi?" (Árni Dahl), apoteksverkið, Tórshavn 1999

#### 4.1.1 Apotekaragrunnurin[4]

Í lógini frá 1913 um apoteksverkið í Føroyum varð ásett í § 6, at *„af apoteker på Færøerne udredes en årlig afgift efter de for apotekerafgift for det øvrige rige gældende regler".* Í kunngerð frá 1918 um apoteksverkið í Føroyum varð ásett, hvussu stórt hetta gjald skal vera, og í somu kunngerð verður ásett, at gjaldið skal rindast inn í danska apotekaragrunnin. Endamálið við grunninum var at læna pening til apotekarar til keyp av apotekum, og veita stuðul til rakstur. Somuleiðis høvdu fráfarandi apotekarar, eftir ávísum reglum, rætt til eftirløn úr grunninum.

4 Í Danmark eitur grunnurin Apotekerfonden (‚apotekaragrunnurin'), tí talan er um grunn fyri apotekarar. Tá Apoteksverkið varð yvirtikið sum føroyskt málsøki, vóru heitini apoteksgrunnur og apotekaragrunnur nýtt hvørt um annað. Rætta heitið er apoteksgrunnur, tí talan er um ‚grunn' hjá Apoteksverkinum. Hetta heitið verður formaliserað í lógini um apoteksverk og heilivág í 1988.

Eftir at Tjaldurs Apotek, frá at vera privat rikið, gjørdist almennur føroyskur stovnur við yvirtøkuna í 1949, helt danski apotekaragrunnurin, av natúrligum orsøkum, uppat at virka í Føroyum. Eftir samráðingar komu landsstýrið og ríkisstjórnin ásamt um, at apotekaragrunnurin skuldi rinda nýstovnaða føroyska apoteksgrunninum kr. 300.000, sum vórðu goldnar í 1950. Hetta var partur av tí peningi, ið goldin var ígjøgnum árini úr Føroyum í danska apotekaragrunnin. Umframt hesar kr. 300.000 komu aðrar uml. kr. 50.000 í grunnin sum gjald frá fráfarandi apotekara fyri útistandandi til grunnin.

Hesar báðar upphæddirnar gjørdust stovnsfæið í nýstovnaða føroyska apoteksgrunninum.

### 4.1.2 Lóggávan í 1949

Sum nevnt omanfyri vórðu tvær nýggjar lógir samtyktar í 1949 í sambandi við yvirtøku av Apoteksverkinum.

Tann fyrra lógin var løgtingslóg nr. 14 frá 28. mars 1949 um apotek.

Ásett verður í lógini, at loyvi krevst frá landsstýrinum til stovnan av nýggjum apotekum, og sambært § 6 í lógini skuldu *„apotek lata árligt gjald eftir reglum, sum landsstýrið ásetir. Gjaldið fer í føroyska apoteksgrunnin. Landsstýrið ásetir nærri reglur fyri henda grunn".*

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið sigur landsstýrið, at hetta í roynd og veru er lógin frá 1913 *„om apotekervæsenet på Færøerne"* við teirri broyting, at landsstýrið yvirtekur uppgávuna hjá donsku stjórnini, og serstakur føroyskur apoteksgrunnur verður settur á stovn. Undir viðgerðini á tingi varð landsstýrið biðið um at fáa greiðu á, hvat føroyska apoteksgrunninum kundi ognast av danska apotekaragrunninum. Landsstýrið varð somuleiðis biðið um at kanna møguleikan fyri at seta á stovn landsapotek.

Tann seinna lógin var løgtingslóg nr. 63 frá 16. desember 1949 um apoteksgrunn o.a. Sambært hesi lóg varð føroyski apoteksgrunnurin stovnsettur í desember mánaði sama ár.

Í §1 í hesi lóg stendur, at apoteksgrunnurin eigur avlopið, sum apoteksraksturin í Føroyum gevur av sær, og *„hevur annars við landskassanum aftanfyri seg fíggjarliga ábyrgd av apotekinum"*. Eisini verður sagt í § 1 í lógini, at *„apotekaragrunnurin verður annars at eiga tann pening, sum kann verða lutaður Føroyum út úr ríkisins apotekaragrunni".* Grunnurin skal somuleiðis eiga vørur á goymslu og fastar ognir, sum grunnurin ognar sær.

Sambært §3 í lógini verður landsstýrinum heimilað til apotekaragrunnin at taka tey lán, sum vørukeyp, fastognarkeyp ella bygging til hvørja tíð gera neyðug. Í viðmerking til uppskotið sigur landsstýrið millum annað, at neyðugt verður at útvega pening til tær vørur, sum skulu vera á goymslu á apotekinum, umframt til keyp av apotekshúsinum.

Landsstýrið hevur í hesum sambandi í fyrstu syftu hugsað sær at taka lán við landskassaábyrgd til hin føroyska apotekaragrunnin, *„soleiðis at hesin grunnur, sum skal eiga rakstraravlopið av apotekinum, endurrindar lánið og svarar renturnar av tí"*. Eisini verður sagt í viðmerkingunum, at roknað verður við, at grunnurin fær útgoldið væl av peningi úr ríkisins apotekaragrunni, og at grunnurin til ta tíð ætlandi verður førur fyri at niðurskriva lánið (úr landskassanum) munandi. Tað, sum tá verður eftir av láninum, endurrindar apotekaragrunnurin av teimum inntøkum, sum hann ár um ár væntast at fáa av avlopinum av apoteksrakstrinum.

Í 1984 setti landsstýrið eina ráðleggingarnevnd fyri Apoteksverkið. Nevndin sá tað sum sítt aðalmál at lata landsstýrinum uppskot til nýggja apoteks- og heilivágslóggávu, og legði nevndin fram álit í mars 1987 saman við uppskoti til nýggja løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág.

Uppskotið varð við ávísum broytingum samtykt av løgtinginum sum Ll. nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág. Henda lógin er við broytingum frá 1991 framvegis í gildi.

## 4.2 Apoteksverkið í verandi skipan

Apoteksverkið er skipað sum almennur stovnur undir landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum.

Øll handfaring av heilivági er regulerað í lóg og kunngerðum. Sostatt hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum generellar heimildir at áseta neyvari reglur fyri virksemið hjá Apoteksverkinum og kann soleiðis við rammustýring hava ávirkan á, hvussu Apoteksverkið verður skipað[5]. Starvsfólkið í Apoteksverkinum er sett sambært sáttmála við Fíggjarmálaráðið.

Landsapotekarin hevur ovastu leiðsluna, og skal saman við apotekarunum standa fyri rakstri, fíggjarætlanum og fíggjarstýring. Harumframt hevur hann eftirlit við, at lógin um apoteksverkið og heilivág verður hildin.

### 4.2.1 Distributión av heilivági

Fýra apotek eru í Føroyum: Tjaldurs apotek í Tórshavn, Suðuroyar apotek á Tvøroyri, Norðoya apotek í Klaksvík og Eysturoyar apotek í Runavík. Hesi taka sær av beinleiðis útflýggjan av heilvági til einstaklingar, sjúkrahús, virki, skip og stovnar, umframt at senda heilivág til tey, ið ikki kunnu koma á apotek at heinta heilivágin.

Sum nevnt omanfyri, verður ein ávísur partur av heilivágnum sendur summum. Borgarar, sum fáa heilivág sendandi, gjalda ikki serstakt fyri flutningin. Flutningsútreiðslurnar eru partur av prísásetingini hjá Apoteksverkinum.

Afturat teimum fýra apotekunum eru 23 hondkeypssølur og 39 heilivágsgoymslur.

Handkeypssølurnar selja nærri ásett úrval av handkeypsheilivági, eitt nú heilivág fyri pínu, sjóverk og ovurviðkvæmi.

Av teimum 39 heilivágsgoymslunum, eru 25 ætlað fólki og 14 ætlað dýrum. Hesi verða nýtt til bráðfeingis útflýggjan av forskriftaskyldugum heilivági. Depotini eru um alt landið, og lækni ella dýralækni kann bíleggja heilivág úr teimum. Endamálið við depotunum er, at bráfeingis sjúkraviðgerð við heilvági kann setast í verk, so skjótt tørvurin er staðfestur av lækna ella dýralækna.

Umsetningurin hjá føroysku apotekunum í 2005 var slakar 150 milliónir krónur. Meginparturin av søluni hjá apotekunum er heilivágur, meðan ein minni partur – 13,4% - eru fríhandilsvørur, sum apotekini ikki hava einkarætt at selja. Nevnast kann, at í Svøríki er myndin tann sama, soleiðis at skilja, at av umsetninginum hjá Apoteket AB í 2005 vóru 13% fríhandilsvørur. Í galdandi løgtingslóg er ásett í §16, stk 1, at *„umframt heilivág er loyvt apotekum at hava hóskandi úrval av øðrum vørum".* Í stk. 2 stendur, at *„Landsstýrið kann áleggja apotekum at reka handil við ávísum vørum, og at steðga við søluni av ávísum vørum".*

5 Hvítabók



### 4.2.2 Útbúgvingarkrøv til starvsfólk

Í apoteksverkinum starvast farmaceutar og farmakonomar, umframt aðrar starvsbólkar. Farmaceutútbúgvingin er ein 5 ára náttúruvísindalig universitets-útbúgving, og tann, sum hevur tikið embætisprógv, kann kalla seg cand. pharm., ið samsvarar við enska Master of Science, stytt MSc(Pharm). Í Danmark er útbúgvingin á Danmarks Farmaceutiske Universitet í Keypmannahavn.

Farmakonomútbúgvingin er ein trý ára útbúgving, og er á apotekunum í samstarvi við Pharmakon í Hillerød. Pharmakon er ein skeið- og undirvísingardepil, sum Danmarks Apotekerforening eigur og rekur, og sum millum annað tekur sær av bókligu útbúgvingini hjá farmakonomum í Danmark. Í lærutíðini fara farmakonomnæmingarnir í Føroyum regluliga á Pharmakon at fáa bókliga undirvísing.

Enn eru nøkur starvsfólk, ið hava gomlu útbúgvingina sum defektrisur, men henda útbúgving verður ikki tikin longur.

Umframt hesar fakbólkar eru starvsfólk úr øðrum starvsbólkum, eitt nú bioanalytikarar, skrivstovufólk, maskinfólk og ófaklærd.

Apoteksverkið hevur avtalu við Pharmakon og Danmarks Farmaceutiske Universitet um ávíkavist farmakonomnæmingar og farmaceutlesandi í starvsvenjing.

### 4.2.3 Eftirlitsfunktión

Apotekini eru undir eftirliti av landsapotekaranum sambært grein 50 í Ll. 104/88 um apoteksverkið og heilivág. Hetta skal tryggja, at apotekini lúka upp til tey krøv, ið ásett eru í lóg og kunngerðum. Til at tryggja, at framleiðslan er á altjóða støði, hevur Landsapotekarin, eftir tørvi, fingið sær serkøna hjálp frá danska Lægemiddelstyrelsen.

Apoteksverkið er komið væl áleiðis at menna eina góðskustýringarskipan grundað á ISO 9001:2000. Hetta arbeiðið verður gjørt í samstarvi við Danmarks Apotekerforening. Ætlanin er, at apotekini verða ISO-góðkend av Dansk Standard, og avtala er gjørd um fyrsta eftirlitið í 2007.

### 4.2.4 Felags EDV-skipan til Apoteksverkið

Kunningartøkni og teldusamskifti er ein týðandi partur av apoteksvirkseminum. Longu í 1985 varð fyrsta telduskipanin ment og sett í verk í apoteksverkinum. Í fyrstani arbeiddu apotekini lokalt, men í 1999 var skipanin miðsavnað. Hetta varð millum annað gjørt fyri at kunna arbeiða við felags roknskapi og felags goymslustýring. Um somu tíð var farið undir við at menna teldusamskiftið, og var hetta upprunin til AHS-netið, sum seinni gjørdist landsnet. KT-skipanirnar hjá apotekunum í Føroyum og í Svøríki hava seinastu mongu árini verið miðsavnaðar. Í Danmark er hetta gjørt fyri stuttum, tí tann tilskotsskipanin til heilivág, sum varð sett í verk í Danmark, og sum var ein eftirgerð eftir svensku skipanini, kravdi hetta.

Uttan hesa telduskipan og góða samskiftisnetið millum apotekini, hevði neyvan borið til at umsitið føroysku tilskotsskipanina til heilivág, soleiðis sum hon er nú. Miðsavnaði dátugrunnurin ger eisini hagtalsviðgerðina við heilivágsbrúkinum í Føroyum munandi lættari.

Arbeitt hevur eisini verið við trygd, tá talan er um at handfara persónsupplýsingar. Her verður hugsað um fysiska, logiska og administrativa trygd, har neyðug tiltøk eru sett í verk fyri at lúka galdandi krøv.

### 4.2.5 Kunning um heilivág

Apotekini skipa fyri kunning og ráðgeving um heilivág á fakliga høgum stigi. Sum partur av fakligu útbúgvingini eru starvsfólkini á apotekunum før fyri at kunna og ráðgeva kundum um heilivág. Harumframt verður regluliga skipað fyri eftirútbúgving av starvsfólki, so tey alla tíðini eru dagførd við neyðugari vitan.

Apotekini skipa eisini fyri temadøgum fyri brúkarum, og halda skeið fyri øðrum fakbólkum í heilsuverkinum.

Týðandi táttur í kunningini hjá Apoteksverkinum eru faldarar um viðkomandi evni, sum hava við heilivág og heilsu at gera.

### 4.2.6 Veitingartrygd

Apoteksverkið hevur sambært grein 15 í løgtingslóg nr. 104 frá 1988 um apoteksverkið og heilivág, skyldu at hava allan neyðugan heilivág tøkan, og í ávísum førum at liggja á goymslu við størri nøgdum av heilivági og øðrum vørum, um landsstýrið metir, at hetta er neyðugt.

Nevnast kann, at í sambandi við tilbúgving, er førleikin at framleiða ávís sløg av heilivági í Føroyum av stórum týdningini. Her verður serliga hugsað um sterilan heilivág til sjúkrahúsini. Tí verður stórur dentur lagdur á at hava eina framkomna framleiðsludeild, sum lýkur altjóða krøv til framleiðslu av heilivági, og sum er mannað við starvsfólki, ið hevur neyðugar royndir og førleika. Hetta er orsøkin til at tað verður mett neyðugt við einari nationalari framleiðsludeild, har førleikin er til staðar, hóast framleiðslan ikki loysir seg handilsliga.

### 4.2.7 Framleiðsla av heilivági

Allur heilivágur, ið framleiddur verður í Føroyum, verður framleiddur á Tjalldurs apoteki í Tórshavn. Tíggju fólk starvast í framleiðsludeildini. Umframt galeniskar[6] og magistrellar[7] tilbúningar, verða eisini tablettir og sterilir tilbúningar[8] framleiddir. Aseptiskar[9] áfyllingar av eitt nú cytostatika[10] verða somuleiðis gjørdar her. Deildin tekur sær eisini av veterinerum heilivági, tvs. dýraheilivági. Framleiðsludeildin í Tórshavn framleiðir eisini til hini apotekini. Í næstum flytur øll framleiðslan í høli hjá Apoteksverkinum á Staraveg 15 í Tórshavn.

Framleiðsla av heilivágsfóðri til alivinnuna fer fram á Staravegi 15 í Tórshavn. Henda framleiðsla hevur fingið EU[11]-góðkenning, og tekur sær av framleiðslu av heilivágsfóðri til alifisk, eisini til útflutnings.

### 4.2.8 Hagtøl

Norðurlendsk hagtøl um heilsu og heilsuverk verða samskipað hjá Nomesco, og Landsapotekarin útvegar hagtøl um heilivágsnýtslu í Føroyum, og luttekur í norðurlenskum fundum um hesi viðurskifti.

Tá talan er um hagtøl um fólkagrundarlagið undir apotekunum í teimum ymisku londunum í Europa, vísir yvirlitið niðanfyri, at í Grikkalandi eru umleið 1.145 fólk fyri hvørt apotek, meðan í Danmark eru umleið 16.500 fólk fyri hvørt apotek. Hetta skal tó síggjast í mun til, at tað er stórur munur á, hvussu apotekini í teimum ymisku londunum verða rikin. Í norðanlondum eru apotekini ofta ‚rein' apotek, har meginparturin av vørunum, ið seldar verða, er heilivágur. Apotekini í suðureuropa hinvegin selja aðrar vørur, sum ikki hava nakað við beinleiðis apoteksvirksemi at gera, og hesin parturin er ofta størri parturin av umsetningum.




Yvirlitið omanfyri vísir, hvussu ymiskt fólkagrundarlagið undir apotekunum er í londunum í Evropa




6 Galeniskur heilivágur er samansettur heilivágur, klárur til nýtslu, eitt nú hostasevjur og salvur.
7 Magistrellur heilivágur er heilivágur, fyriskipaður av lækna á forskift til ávísan sjúkling, sum verður framleiddur í hvørjum einstøkum føri.
8 Sterilur tilbúningur er heilivágur, framleiddur í serliga reinum umhvørvi, og síðani steriliseraður, vanliga við hitaviðgerð.
9 Aseptisk framleiðsla merkir, at heilivágurin verður framleiddur í serliga reinum umhvørvi. Av tí at heilivágurin ikki verður endaliga hitaviðgjørdur, verða uppfaftur strangari krøv sett til reinføri, enn við sterila framleiðslu.
10 Cytostatika er heilivágur fyri krabbasjúkur
11 EU: Europan Union

# 5. Skipan av apotekunum í Føroyum og londunum kring okkum

Heilivágsøkið er sera samansett og merkt av, at nógvir ymiskir áhugabólkar eru við. Í flestum londum er heilivágsøkið væl skipað við lógum og reglugerðum. Allastaðni eru lógir, kunngerðir og leiðbeiningar, sum í minstu smálutum gera av, hvat ið er heilivágur, hvussu hann verður framleiddur, hvør skal útinna arbeiðið, og hvussu heilivágurin verður býttur út og handfarin. Lóggávan ásetur til dømis, at øll heilivágsvirki skulu hava almenna góðkenning til at framleiða og marknaðarføra heilivág. Henda stranga reguleringin er trygd fyri, at borgarin kann kenna seg tryggan við heilivágnum, sum virkini framleiða.

## Játtanarskipan til apotek

Fyri 60 árum síðan vóru vanligu apotekini í Norðurlondum skipað á sama hátt. Apotekini vóru privat ogn, men skipa av ríkinum í eina farmaceutiska einkaloyvis- og játtanarskipan. Henda skipan líkist mest teimum skipanunum, sum eru í Danmark og Finnlandi nú.

Søguliga hava apoteksskipanirnar í Norðurlondum líkst nógv. Tá viðurskiftini viðvíkjandi heilivági gjørdust meir skipað, varð kravt kongligt loyvi fyri at reka apotek. Í okkara tíð eru broytingar farnar fram, sum greitt er frá niðanfyri.

### *Svøríki*

Fyrsta apotekið í Norðurlondum var, sum áður nevnt, kongliga Hof-apotekið í Stockholm, ið varð sett á stovn í 14. øld. Síðan tá hava apotekini verið privat rikin, men í 1970 varð umfatandi broyting gjørd í apoteksskipanini. Svenski ríkið keypti apotekini frá privatu apotekarunum, og stovnaði almenna partafelagið Apoteksbolaget AB, ið síðan hevur rikið apotekini fyri tað almenna, nú undir heitinum Apoteket AB. Tað almenna rekur eisini sjúkrahúsapotekini. Síðan Svøríki gjørdist limur í EU, hevur spurningur verið settur, um eitt alment apoteksverk samsvarar við EU-lóggávu. Í 2005 feldi EU-dómstólurin tann dóm, at svenska apoteksskipanin ikki stríddi móti EU-lóggávu[12].

### *Ísland*

Næsta broytingin í teirri gomlu norðurlendsku apoteksskipanini var í Íslandi í 1996, tá ið íslendska apoteksskipanin varð liberaliserað. Liberaliseringin í Íslandi hevði við sær stórar broytingar; latið varð upp fyri eini avsláttarskipan á forskriftaskyldugum heilivági og fríari prísáseting á handkeypsheilivági, fríari stovnseting av nýggjum apotekum, og kravið var ikki longur, at farmaceutur skuldi eiga apotekið.

### *Noreg*

Norsku apotekini vórðu liberaliseraði í 2001. Frá at hava eina loyvisskipan á sama hátt sum tann í Danmark, har ein farmaceutur skuldi eiga og reka apotekið, varð skipanin broytt til at líkjast tí bretsku og íslendsku. Einstaklingar ella fyritøkur søkja Helse- og omsorgsdepartementet um loyvi (‚konsesjón') at reka apotek. Tað er ikki longur eitt krav at apoteksánarin skal vera farmaceutur, bert skal ein farmaceutur hava dagligu leiðsluna av apotekinum. Ongin avmarking er longur, hvussu nógv apotek skulu verða – tað er onki loyvisloft. Hetta ger, at talið av apotekum verður avmarkað av, hvat marknaðurin kann bera.

12 EU dom , C-438/02, 2005-05-31

### *Danmark*

Játtanarskipanin í Danmark er skipað soleiðis, at loyvi krevst frá Innlendis- og heilsumálaráðnum at reka apotek. Í praksis er tað soleiðis, at tá ein apotekari fer frá ella doyr, verður apoteksloyvið lýst leyst at søkja. Umsøkjararnir senda umsóknina til Innlendis- og heilsu- málaráðið, ið síðan ger av, hvør skal fáa apoteksloyvið, og harvið keypa apotekið. Serligar reglur eru fyri útjavnan av avlopi, sí 5.1.

### *Finnland*

Fyrsta apotekið í Finnlandi læt upp í 1689, og nú eru umleið 800 apotek í Finnlandi. Apotekini í Finnlandi eru privat, og lóggávan ásetur, at ein apotekari ikki kann eiga fleiri enn eitt apotek. Kortini kann apotekarin hava upp í tríggjar deildir í økinum rundan um apotekið. Tað eru finsku heilsumyndugleikarnir, ið geva loyvi at reka apotek. Sum nakað serligt í Finnlandi eigur universitetið í Helsinki eina apoteksketu.

Tá ein apotekari fer frá ella doyr, verður apoteksloyvi lýst leyst at søkja. Myndugleikarnir kunnu gera av, at eitt nýtt apotek skal setast á stovn í einum øki, har fólkatalið veksur, og onki apotek er frammanundan. Eins og í Danmark eru serligar reglur um útjavnan av avlopi.

### *Føroyar*

Fyrsta broytingin í føroysku apoteksskipanini varð, sum áður nevnt, framd í Føroyum í 1949, tá Landsstýrið yvirtók donsku apoteksskipanina, og stovnaði eitt alment apotek, stjórnað av Landsapotekaranum. Næsta stóra broytingin varð sum áður nevnt gjørd, tá løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág varð sett í gildi 1. januar 1989.

Í høvuðsheitum eru tríggjar ymiskar apoteksskipanir í norðanlondum:

1. Ein farmaceutiskt einkaloyvisskipan (monopol) sum í Danmark og Finnlandi,
2. Ein almenn einkaloyvisskipan (monopol) sum í Føroyum og Svøríki og
3. Ein liberaliserað skipan sum í Íslandi og Noregi

### *Bretland*

Umframt tær norðurlensku apoteksskipanirnar lýsir arbeiðsbólkurin eisini apoteksskipanina í Bretlandi, sum er eitt av grannalondunum. Bretska skipanin er liberaliserað, og minnir mest um skipanirnar í Íslandi og Noregi.

Í Bretlandi eru tað lokalu heilsumyndugleikarnir, Primary Care Trusts, sum í stóran mun hava fingið latið upp í hendi frá National Health Service (NHS), at umsita at geva loyvi at reka apotek. Primary Care Trusts fevna um øki við umleið ½ millión íbúgvum, og hava eitt avgerandi orð at siga, serliga tá tað snýr seg um at gera eina meting av, um fleiri apotek skulu vera í einum ávísum øki.

### Yvirlit yvir hvussu apotek verða regulerað í ymiskum londum

| | Bretland | Finnland | Danmark | Noreg | Svøríki | Ísland |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Krevst loyvi til at reka apotek?** | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| **Avmarkingar í eigaraviðurskiftum?** | Nei | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| **Tal av apotekum fyri hvønn eigara avmarkað?** | Nei | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| **Frælsi til at áseta prísin á forskriftaskyldugum heilivági?** | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

Heilivágsmarknaðinum er í nógvum førum skipaður undir altjóða standardum, reglum og vegleiðingum, sum eru gjørdar í altjóða ella regionalum stovnum (WHO; WTO[13]; ICH[14]; FDA[15]; EU). Eftir hesum kunnu ríkis myndugleikar áseta harðari ella linari krøv. Í framkomnum londum verða reglurnar handfarnar nógv strangari enn í tilafturskomnum londum.

Neyvan er nøkur heilt lýtaleys apoteksskipan, og tær skipanir sum vit umrøða, hava allar fyrimunir og vansar.

## 5.1 Danska/finska skipanin

Sum áður nevnt, so eru tær gomlu norðurlendsku skipanirnar farmaseutiskar monopolskipanir. Hetta merkir, at tann, ið fær loyvi til at reka apotek, skal hava farmaseutiskt embætisprógv. Vanliga keypir nýggi apotekarin bygning, innbúgv og vørugoymslu frá fráfarandi apotekara. Hesin rekur síðani apotekið sum eina privata fyritøku, við teimum

13 World Trade Organisation
14 The International Conference on Harmonisation of Technical Requirements for Registration of Pharmaceuticals for Human Use
15 U.S. Food and Drug Administration

avmarkingum, sum eru settar av avvarðandi myndugleikum.

Í Danmark er føst prísáseting á heilivági. Undantikið er tó eitt avmarkað tal av handkeypsheilivági í smærri pakningum, sum eisini fæst til keyps uttan um apotekini. Hetta verður eisini umtalað niðanfyri.

Á hvørjum ári verður avtala gjørd millum Danmarks Apotekerforening og Innlendis- og heilsumálaráðið um, hvussu stórt samlaða avlopið av heilivágssøluni skal verða fylgjandi ár. Tá árið er liðugt, er ein útjavningarskipan galdandi, har partur av avlopinum hjá teimum apotekum, sum hava størst avlop, verður býtt til tey apotekini, sum hava minst avlop.

Umframt útjavningarskipanina, so er galdandi, at um samlaða avlopið er størri ella minni enn tað, sum í verandi ári er avtalað millum Innlendis- og heilsumálaráðið og Danmarks Apotekerforening, verður javnað út árið eftir við broyting av prísunum á heilivági.

Ein av fyrimununum við donsku skipanini er, at hon fevnir um alt landið, tvs. at apotek í útjaðaraøkjum verða stuðlaði, sum nevnt omanfyri. Borgararnir eru yvirhøvur javnsettir við atliti at tænastuveitingum hjá apotekunum, og sami heilivágsprísur er galdandi í øllum landinum.

Ein vansi við skipanini kann vera, at apotekini sum privatar handilsfyritøkur miðja eftir at fáa mest møguligan vinning, uttan at nøkur verulig prískapping er í skipanini. Haraftur ímóti ger útjavningarskipanin, at apotekarar ikki hava áhuga í at vinna ov nógv, tí partur av avlopinum verður tikin frá teimum, og býttur út til teir apotekarar, ið hava minst avlop.

Seinnu árini hava apotekini í Danmark mist einkarættin at selja fleiri sløg av handkeypsheilivági. Hesin heilivágur fæst til keyps í smærri pakningum í vanligum handlum, sum hava fingið søluloyvi frá Lægemiddelstyrelsen at selja henda heilivág. Lægemiddelstyrelsen hevur eftirlit við hesum virksemi.

Henda gongd er ikki eindømi fyri Danmark, tí lond sum Bretland og USA hava fyri fleiri árum síðan loyvt, at seld verða ávís sløg av handkeypsheilivági í vanligum handlum.

Í Finnlandi eru apotekini privat, á sama hátt sum í Danmark. Tó er ein apoteksketa í Finnlandi, Universitetsapoteket, sum rekur 17 av teimum 597 apotekunum[16]. Líknandi útjavningarskipan er galdandi fyri finsku apotekini, sum teirri, ið eru galdandi í Danmark.

Fyri at tálma útreiðslunum til heilivág, hava myndugleikarnir í Danmark og Finnlandi álagt apotekunum ‚generisk substitutión'[17] av forskriftaskyldugum heilivági.

Arbeitt verður í báðum londum við at bjóða brúkarunum heilivágssýn[18] (‚medicinprofil'). Upplýsingar um tann heilivág, sum ein brúkar, verður goymdur í einum miðsavnaðum

16 Läkemedelsdistribution i Norden – en komparativ studie av aktörer, resurser och aktiviteter (C. Holmberg et al.), Stockholm School of Economics, Center for Marketing, Distribution and Industry Dynamics, SSE/EFI Working Paper Series in Business Administration No. 2003:10
17 Generisk substitutión merkir, at umbýti fer fram á apotekinum, frá einum dýrari slagi av heilivági til eitt bíligari slag av sama heilivági
18 Heilivágssýn merkir, at farmaceutur eftirkannar heilivágin, sum sjúklingurin fær, og tosar við viðkomandi um heilivágin, soleiðis at tryggjað verður, at heilivágurin verður tikin rætt.

dátugrunni. Á tann hátt ber til at ráðgeva viðkomandi um heilivágsnýtslu, og møguliga at kunna læknan, um mett verður, at heilivágir, sum viðkomandi tekur, ikki sampakka.

## 5.2 Føroyska/svenska skipanin

Tað, sum eyðkennir almennu monopolskipanirnar í Føroyum og Svøríki er, at landið er ánari. Skipanirnar tykjast at vera støðugar, tryggar, og veita góða fakliga tænastu, ið eru um alt landið. Borgararnir eru javnsettir við somu tænastuveitingum og sama heilivágsprísi á øllum apotekum.

Svenska apoteksskipanin hevur síðan 1970 verið skipað sum partafelag, fyrst undir navninum Apoteksbolaget AB og síðan 1998 undir navninum Apoteket AB. Svenska ríkið eigur øll partabrøvini í Apoteket AB, og umsetningurin var í 2005 36 milliardir svenskar krónur. Apoteket AB er næststørsta partafelag í Svøríki, har ríkið eigur øll partabrøvini.

Størsta partafelagið í Svøríki, sum ríkið eigur 100%, er orkufelagið Vattenfall AB, ið hevði ein umsetning uppá 115 milliardir svenskar krónur í 2004.

Sum áður nevnt, undir 4.2.1 um verandi skipan viðvíkjandi føroyska apoteksverkinum, so verður ein partur av heilivágnum sendur. Borgarar, sum fáa heilivág sendandi, gjalda ikki serstakt fyri flutningin. Flutningsútreiðslurnar eru partur av prísásetingini hjá Apoteksverkinum, og er hetta eitt dømi um, at sosial atlit verða tikin til borgararnar. Sambært ársfrágreiðingini fyri Apoteket AB fyri 2005 leggur svenska skipanin eisini upp til at senda heilivág til brúkarar uttan eykakostnað fyri brúkarin[19].

Serframleiðsla av heilivági, ið ikki fæst til keyps frá heilivágsfyritøkum, tí tað antin ikki loysir seg at framleiða í stórdrift, tí haldgóðskan er stutt ella av aðrari orsøk, fer í stóran mun fram á apotekum, sum tað almenna eigur. Hetta er eisini galdandi á sjúkrahúsapotekum í hinum Norðurlondum, burtursæð frá Íslandi.

19 Årsredovisning 2005, Apoteket AB, Stockholm, 28. februar 2006

Nevnast kann, at tá íslendska apoteksskipaninin varð liberaliserað, varð almenna framleiðslan umskipað í eitt alment partafelag. Tá partabrøvini eftirfylgjandi vórðu seld til størstu privatu heilivágsfyritøkuna í Íslandi, varð framleiðslan av heilivági seinni niðurløgd. Sambært upplýsingum frá íslendska heilsumálaráðnum er neyðugt at hugsa um at endurreisa almennu framleiðsluna av ávísum heilivági til sjúkrahús.

Ein skipan, sum tann, vit hava í Føroyum, gevur stórrakstrarfyrimun, tí møguleiki er fyri at samráða seg til størri avsláttur frá søluliðnum, tí nøgdirnar eru størri, enn um talan var um einstøk privat apotek. Harafturímóti er búskaparligur vinningur ikki so týdningarmikil sum hjá privatum fyritøkum ella virkjum. Tað kann bæði hava fyrimunir og vansar við sær. Ein vansi er, at eingin kapping er í skipanini, og eingin búskaparlig tileggjan til at menna og bjóða út nýggjar tænastur og stovna nýggj apotek. Starvsfólk eru eisini meira avmarkað við starvsmøguleikum í eini almennari skipan, enn um talan var um privat apotek.

Svensku og føroysku apoteksmonopolini keypa heilivág frá heilsølum, og í summum førum beinleiðis frá heilivágsframleiðarum. Í Svøríki eru tvær heilivágsheilsølur, Kronans Droghandel og Tamro. Apoteket AB, og harvið svenska ríkið, átti 18% av Tamro inntil 2003, tá ið partabrøvini vórðu seld privatum.

Í Svøríki er ein serlig nevnd, Läkemedelsförmånsnämnden (LFN), sum ásetur søluprísin á heilivági. Prísurin á heilivági, sum apotekini keypa inn, er ein samráðingarspurningur millum heilivágsfyritøkunar og LFN. Hvussu nógv borgarin skal rinda fyri heilivágin, verður stýrt við reglum um mestagjald fyri heilivág. Hesar reglur verða gjørdar av svenska ríkisdegnum. Søluprísurin á heilivági frá apoteki verður ásettur eftir keypsprísinum á heilivágnum. Dýrari heilivágur hevur minni prosentvísan vinning enn bíligari heilivágur. LFN ásetur, hvussu stórt avlop Apoteket AB skal hava.

Í Svøríki liggur eftirlitsmyndugleikin við Apoteket AB hjá Läkemedelsverket og Sosialstyrelsen. Hesir stovnar hava eftirlit við apotekunum, og seta krøv til eitt nú tænastuveitingar og trygd á heilivági.

Apoteksverkið í Føroyum fevnir um myndugleikauppgávur, fyrisiting og sjúkrahúsfarmaci, umframt tær uppgávur, sum eitt vanligt apotek annars tekur sær av. Føroysku apotekini keypa meginpartin av heilivágnum frá donsku heilivágsheilsøluni Nomeco. Nomeco situr á umleið 70% av danska heilivágsmarknaðinum.

Í Svøríki og Føroyum er ongin kappingarneyti, tá talan er um tænastutilboð til borgararnar. Apotekini royna tí, í tann mun tað ber til, at vera proaktiv og veita heilsufremjandi og heilsufyribyrgjandi tænastur. Sum dømi um slík tilboð kunnu nevnast roykiavvenjingarskeið og blóðtrýstsmálingar. Í Svøríki er útinnan av slíkum tænastum ein samráðingarspurningur millum landið og Apoteket AB, meðan landsstýrismaðurin í Føroyum kann áleggja apoteksverkinum tílíkar uppgávur.

**Munirnir millum føroysku og svensku skipanina eru í høvuðsheitum at:**

- Apoteket AB í Svøríki er eitt partafelag, har ríkið eigur allan partapeningin. Apoteksverkið í Føroyum er partur av almennu fyrisitingini.
- Myndugleikauppgávan í Føroyum er partur av Apoteksverkinum, meðan henda uppgáva í Svøríki er skild frá apoteksverkinum.
- Í Svøríki eru serstøk sjúkrahúsapotek, meðan hetta arbeiðið verður røkt av apotekunum í Føroyum.



## 5.3 Íslendska/norska skipanin

Íslendska apoteksskipanin varð liberaliserað í 1996. Í Noregi varð gamla skipanin við apoteksloyvum avtikin 1. mars 2001. Í báðum londum er loyvt einum og hvørjum at eiga apotek, eisini juridiskum persónum, so sum partafeløgum, smápartafeløgum v.m. Bæði í Íslandi og Noregi skal ein farmaceutur hava fakligu ábyrgdina fyri apotekið. Bæði londini loyva apoteksketum.

Sostatt er størsta broytingin í íslendsku og norsku skipanini, at tað ikki longur er eitt krav, at farmaseutur eigur apotekið. Haraftur ímóti skal farmaceutur hava fakligu ábyrgdina av apotekinum.

Fyrimunirnir við skipanunum eru eitt nú, at lutvísa kappingin hevur loyvt fleiri apotekum at hava opið longur og at fleiri tænastur verða bjóðarar út. Í Íslandi verður avsláttur givin á forskriftarskyldugan heilivág. Tað er brúkarin, ið fær nyttuna av hesi avsláttarskipan, meðan landið ikki fær samsvarandi ágóða.

Síðan januar 2001 og til mars 2004 eru 128 nýggj apotek stovnað í Noregi. Hetta svarar til eina øking uppá 32%. Til samanberingar vórðu 71 nýggj apotek sett á stovn frá 1991 til 2000. Flestu av nýggju apotekunum liggja í størri keypsskálum og í miðstaðarøkjum í størru býum. Av teimum 434 sóknunum í Noregi høvdu 210 ikki apotek áðrenn liberaliseringina. Við árslok 2003, tvey ár eftir liberaliseringin, var hetta talið komið niður á 200. Tað eru serliga fábygdu økini, ið ikki hava apotek[20].

Sum dømi um, hvussu liberaliseraða skipanin í Íslandi skarvar av tænastum, sum ikki loysa seg fíggjarliga, kann nevnast, at nú er onki vaktapotek í Íslandi. Hetta merkir, at um ein borgari skal hava heilivág eftir vanliga afturlatingartíð, er neyðugt at fáa heilivágin frá lækna ella sjúkrahúsi.

Í Íslandi eru tað apoteksketur, og í Noregi eru tað stórar handilsfyritøkur, ið eiga tey flestu apotekini. Apotek verða latin upp, har stórhandlar eru. Ein stór týsk heilivágsheilsøla eigur nú fittan part av norsku apotekunum.

Liberaliseraðu skipanirnar við apoteksketum geva stórarakstrarfyrimunir, men eggja ikki í sama mun til ókeypis tænastum til frama fyri fólkaheilsuna, sum tann føroyska/svenska skipaninin. Eitt dømi um hetta í Føroyum eru samskipaði tiltøk saman við eitt nú Fyribyrgingarráðnum.

Eins og undir tí donsk/finsku skipanini, kann henda skipan eisini stuðla upp undir, at roynt verður at spara sum mest í útreiðslum, eitt nú við at nýta so bíliga arbeiðsmegi sum til ber, til tess at fáa mest møguligt burturúr. Hetta kann vera óheppið, um hetta gongur út yvir fakligu góðskuna og trygdina av heilivágsnýtsluni. Tí er neyðugt við strongum almennum eftirliti, soleiðis sum tað er í flest øllum londum.

Í 2003 varð ‚Bransjerådet for apotekene i Norge' sett á stovn í Noregi, sum hevur eftirlit við apotekunum, at tey eftirliva myndugleikakrøvunum til apoteksvirksemi. Í mun til tilsvarandi bretsku skipanina, hevur tann norska skipanin ikki sanktiónsheimildir.

Í Íslandi eru apotekini sambært heilivágslóggávuni partur av almenna heilsuverkinum, men spurnartekin kann setast við, um tað er so í veruleikanum. Talan er ikki um somu veitingartrygd í neyðstøðu, sum í almennu skipanini. Her verður eitt nú hugsað um infusiónsvætur til sjúkrahúsini. Almenna íslendska heilivágsframleiðsluvirkið ‚Lifjaverzlum Ríkisins' varð, sum áður nevnt, umskipað í alment partafelag, og seinni vórðu partabrøvini seld privatum. Heilivágsfyritøkan Delta/Pharmaco keypti øll partabrøvini, og fekk soleiðis monopol upp á heilivágsframleiðsluna

20 Anders Anell:Deregulating the pharmacy market: the case of Iceland and Norway, Health Policy 75 (2005) 9–17

í Íslandi. Samstundis keypti Delta/Pharmaco eisini heilivágsfyritøkuna Omega Pharma. Delta/Pharmaco hækkaði prísirnar á heilivági, men íslendska nevndin fyri áseting av heilivágsprísum góðtók ikki príshækkingarnar. Úrslitið varð, at sterilframleiðslan varð niðurløgd, og heilivágurin verður í staðin innfluttur av Pharmaco (nú Vistor).

Íslendingar umhugsa nú, sum longu nevnt, at fara undir at endurskipa framleiðslu av heilivági í almennum høpi. Her verður serliga hugsað um framleiðslu til sjúkrahús, serliga tí at í eini møguligari neyðstøðu er neyðugt skjótt at kunna útvega neyðugan heilivág.

Í Íslandi eru apotek í fábygdum økjum broytt til minni apoteksdeildir, og tænastuveitingarnar eru á einum lægri støði enn á einum vanligum apoteki. Tað er bíligari at reka eina apoteksdeild, tí fakligu krøvini ikki eru eins høg og á einum apoteki. Líkt er eisini til, at kappingin bæði í Íslandi og Noregi er linkað, samanborin við ta hon var, tá liberaliseringin byrjaði, og at gongdin nú ber fram í móti eini støðu, har fá máttmikil sølufeløg býta marknaðin millum sín.

Í Íslandi hava tvær apoteksketur 85 % av heilivágssøluni, og í Noregi hava tríggjar apoteksketur 97 % av heilivágssøluni.

### 5.4 Bretska skipanin

Higartil hava liberaliseraðu skipanirnar í Íslandi og Noregi ikki livað upp til ta kapping, ið roknað varð við, við tað at fáar og stórar heilivágsheilsølur eiga ein stóran part av apotekunum. Hetta hevur millum annað gjørt, at heldur enn at deregulera marknaðin, eru fleiri reguleringar settar í verk av myndugleikunum.

Tann bretski marknaðurin er munandi størri enn marknaðirnir í Norðurlondum, og liberala apoteksskipanin í Bretlandi tykist at virka væl. Hetta kundi bent á, at tað skal ein ávís marknaðarstødd til, áðrenn ein verulig kapping hevur livilíkindi. Bretska apoteksskipanin líkist tí amerikansku á tann hátt, at vanligir dagligvøruhandlar hava loyvi at reka apotek, og apotekini verða rikin av fólki, ið hava handilsligar royndir.

Hóast krav er um at farmaceutur skal hava fakligu ábyrgdina av apotekinum, so er tað ein royndur lutur, at ein fakliga góður farmaceutur ikki nýtist at duga væl at reka ein handil. Her hava stóru handilsketurnar í Bretlandi (eitt nú Tesco, Sainsbury og Safeway) tann fyrimun, at handilsliga lærd fólk, við royndum innan keyp og sølu, samráðast beinleiðis við heilivágsfyritøkur og heilsølur um best møguliga prís fyri heilivágin. Fleiri og fleiri av stóru handlunum í Bretlandi hava opið til langt út á kvøldarnar ella alt samdøgrið, og tí ber til at fáa avgreitt forskriftir uppá heilivág nærum allan sólarringin. Hetta ger eisini, at minni tørvur er á vaktapotekum.

Stórhandlarnir kappast ikki bert um at fáa avgreitt forskriftir frá viðskiftafólki, men eisini at kunna bjóða ymsar tænastur til borgaran, eitt nú leiðbeiningar um heilivág og koppingarevni, tá fólk fara í heitari lond í summarfrí.

Umframt hesar fyritøkur eru eisini apoteksketur, sum til dømis Boots, Lloyds og Superdrug, sum í høvuðsheitum fáast við apoteksvirksemi. Eisini eru smærri privat apotek, sum einstaklingar eiga og reka.

Lokalu heilsumyndugleikarnir, Primary Care Trusts (PCT), geva loyvi til at reka apotek í lokaløkinum. Lokalmyndugleikarnar veita harafturat samsýning til apotekini til at gera og ráðgeva um heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tiltøk. Sum dømi um slík tiltøk kunnu nevnast roykiavvenjingarskeið, málingar av blóðsukri, blóðtrýsti, kolesteroli og BMI (Body Mass Index). Somuleiðis fáa apotekini samsýning fyri at kunna skúlanæmingar og serligar vandabólkar, so sum rúseiturmisnýtarar, um heilivág.

Í Bretlandi er verkætlanin ‚Choosing Health through pharmacy – A programme for pharmaceutical public health 2005-2015'[21] farin av bakkastokki sum liður í heilsuætlanini ‚Choosing Health'. Bretska stjórnin hevur sett sær sum mál at allir partar í heilsuverkinum skulu virka saman fyri at fremja heilsuna hjá bretska fólkinum.

Bretska verkætlanin nevnir tríggjar hættir at verja heilsuna hjá fólki. Tann fyrsti hátturin er primer fyribyrgjing (‚primary prevention').

Her verður hugsað um átøk fyri at menna fólkaheilsuna, og ábyrgdin av hesum átøkum liggur hjá teimum, sum arbeiða við sjúkufyribyrging. Myndaliga verður hesin hátturin at arbeiða uppá samanborin við at arbeiða seg longur frá sjóvarmálanum, til tess at fyribyrgja, at fólk detta í sjúkunnar hav, tað vil siga, at fólk gerast sjúk.

Annar hátturin (‚secondary prevention') er at staðfesta sjúkur tíðliga, soleiðis at til ber at seta í verk viðgerð ella tiltøk, áðrenn sjúkan hevur gjørt um seg.

Triði hátturin (‚tertiary prevention') hevur til endamáls at minka árinið av sjúkuni, og at fáa heilsuna aftur við heilsubøtandi átøkum.

Bretska stjórnin hevur sett sær fyri, at apotekini í nógv størri mun enn áður skulu hava ein virknan leiklut í heilsufremjandi tiltøkum.

Av øðrum átøkum í Bretlandi kunnu nevnast, at apotekini skulu binda seg til at verða við í minst tveimum heilsuátøkum um árið, sum lokalu heilsumyndugleikarnir - PCT - skipa fyri. Eisini skulu farmaceutar gjøgnumganga heilivágin, sum fólk nýta, og ráðgeva teimum um heilivágin.

Eftirlitið við apotekunum ger bretska farmaseutiska felagið (Royal Pharmaceutical Society of Great Britain), ið eisini viðger klagur um apotek ella starvsfólk á apoteki. Bretska farmaseutiska felagið hevur heimild til at steingja apotek, sum ikki fylgja lógum og reglum, ið ásettar eru. Umframt hetta kann Bretska farmaseutiska felagið frátaka farmaceuti loyvi at arbeiða á apoteki, um hesin brýtur lógarreglur ella etiskar reglur, ið ásettar eru.



21 ‚Choosing health through pharmacy – A programme for pharmaceutical public health 2005-2015', Department of Health, April 2005 www.dh.gov.uk/publications

# 6. Fíggjarligir frymlar fyri føroyska Apoteksverkið

## 6.1 Stutt lýsing hvussu Apoteksverkið er skipað fíggjarliga nú

Apoteksverkið er stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum, og hevur einkarætt at framleiða, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág, uttan so at annað er ásett í lógini um apoteksverk og heilivág. Kortini kunnu onnur fáa loyvi frá landsstýrismanninum til at framleiða heilivág til útflutnings, og til sølu til Apoteksverkið.

Apoteksverkið hevur síðan 2000 verið skipað sum ein landsfyritøka á løgtingsfíggjarlógini, sí 6.2.2. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum umhugsaði longu tá Apoteksverkið kom á løgtingsfíggjarlógina fyri 2000, at kanna fyrimunur og vansar við at umskipa Apoteksverkið. Tað framgongur av viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina fyri fíggjarárið 2000, *„Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur eisini sett sær fyri at kanna fyrimunir og vansar við at umskipað Apoteksverk Føroya til alment partafelag ella heilt at privatisera tað"*[22]. Í einum skrivi til løgtingsgrannskoðarnar í februar 2001 frá landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, stendur hinvegin millum annað: *„Til kanningina av fyrimunum og vansum við at umskipa apoteksverkið til alment partafelag ella heilt at privatisera tað, er niðurstøðan, at tað í løtuni ikki verður mett at geva nakran avgerandi fyrimun at umskipa apoteksverkið."*[23]

Tað hevur verið eitt ávíst kjak um fíggjar- og rættarstøðu Apoteksverksins. Tað, sum hevur verið ein afturvendandi spurningur tey seinastu umleið 12 árini er, hvørt Apoteksverkið skal vera á løgtingsins fíggjarlóg, ella hildið uttanfyri. Skiftandi landsstýrismenn hava viðgjørt málið politiskt, og nú eru hervið tikin stig til at fáa endaliga loysn á málinum.

Sum omanfyri nevnt, so varð málið partvíst loyst í samband við, at Apoteksverkið kom við á Løgtingsfíggjarlógina í ár 2000.

Fíggjarviðurskiftini hjá Apoteksverkinum eru nú lýst í § 22 í Løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág við seinni broyting:

**„§ 22.** *Apoteksgrunnurin, landsapotekarin og apotekini eru ein búskaparlig eind.*

*2. stk. Landsapotekarin og hvørt av apotekunum hava hvørt sín roknskap, sum verður grannskoðaður av ríkisgóðkendum grannskoðara og síðan góðkendur eftir reglunum um almennan roknskap.*

*3. stk. Fíggjarætlanaruppkast og takstuppskot fyri apoteksverkið verða viðgjørd av landsapotekaranum og apotekarunum í felag og verða við teirra fylgisviðmerkingum send landsstýrinum.*

*4. stk. Fíggjarætlanaruppskotið verður sent landsstýrinum í seinasta lagi á hvørjum ári til ta tíð, landsstýrið hevur ásett".*

Harumframt eru ásetingar um apoteksgrunnin í §§ 23 og 24 í somu lóg:

**„§ 23.** *Apoteksgrunnurin er undir landsstýrinum og hevur til endamáls at fíggja apoteksverkið.*

*2. stk. Avlopið frá apoteksrakstrinum fellur til apoteksgrunnin.*

*3. stk. Apoteksgrunnurin eigur vørugoymslurnar, innbúgv og føstu ognirnar hjá apoteksverkinum.*

**§ 24.** *Landsstýrinum er heimilað vegna apoteksgrunnin at taka tey lán, sum vørukeyp, fastognarkeyp, bygging og umbygging hvørja tíð krevja."*

22 Løgtingsfíggjarlóg, Tekstur og viðmerkingar, (dagførd), fyri fíggjarárið 2000, Fíggjarmálaráðið

23 Almanna- og heilsumálaráðið, J.Nr. 0.34-2001163/7, dagfest 9. februar 2001

Alt eftir hvør leistur verður valdur fyri Apoteksverkið framyvir, so hevur tað ávirkan á, hvørjar lógarbroytingar skulu gerast. Verður til dømis valt at skipa Apoteksverkið framyvir eins og nú, sum ein landsfyritøka, verður neyðugt at endurskoða omanfyri nevndu viðurskifti.

## 6.2 Á fíggjarlóg

Tá talan er um skipan av almennum stovnum innanfyri løgtingsfíggjarlógina, eru tveir møguleikar: rakstrarjáttan og landsfyritøka.

### 6.2.1 Rakstrarjáttan[24]

Tá talan er um rakstrarjáttan, er í høvuðsheitum talan um stovnar, sum fult út verða fíggjaðir av landinum. Rakstrarjáttan er ein nettoútreiðslujáttan til tann ella teir landsstovnar, sum høvuðskontan fevnir um. Stovnurin kann hava rakstrarútreiðslur og –inntøkur samsvarandi viðmerkingunum til høvuðskontuna. Meirinntøkur geva rætt til at hava samsvarandi meirútreiðslur, tó er ikki loyvt at fara uppum ásetta lønarkarmin. Rakstarjáttan kann verða veitt sum rakstrarjáttan til vanligt virksemi, ella sum rakstrarjáttan til inntøkufíggjað virksemi. Farið verður ikki nærri inn á hetta játtanarslagið, tí mett verður, at tað ikki er aktuelt í hesum føri.

### 6.2.2 Landsfyritøka[25]

Hin møguleikin er játtanarslagið landsfyritøka, sum verður nýtt, tá virksemið hjá almennum stovni í høvuðsheitum er vinnuligt, og tað tí er skilabest at geva leiðsluni størri møguleikar at laga virksemið eftir marknaðarviðurskiftunum.

24 Løgtingsfíggjarlóg fyri 2006, játtanarskipanin

25 Løgtingsfíggjarlóg fyri 2006, játtanarskipanin

Játtanin er eitt nettotal, sum er ein játtanarkarmur til nettoútreiðsluna hjá fyritøkuni. Í høvuðsheitum eru tær somu ásetingar galdandi, sum fyri játtanarslagið rakstrarjáttan, herundir góðkenning av ávísum størvum. Hetta merkir til dømis fyri apoteksverkið, at Fíggjarmálaráðið skal góðkenna øll tænastumannastørv og øll onnur størv við eini løn svarandi til tænastumannastørv í 36. lønarflokki ella hægri, áðrenn tey verða skipað.

Hetta merkir eisini, at landsfyritøka, ið skal gera ætlanir um byggi- og løguarbeiði, kann nýta pening til fyrireikandi kanningar, herundir tørvsmetingar. Útreiðslur til framhaldandi fyrireikingararbeiði og projekteringsútreiðslur krevja tó serstaka løgujáttan. Er talan um størri løgujáttanir, sum ofta fevna um fleiri fíggjarár, er meginreglan, at landsstýrismaðurin leggur uppskot fyri Løgtingið um serstaka lógarheimild til tess at tryggja, at tílík týðandi mál verða nóg væl lýst og fáa eina hóskandi viðgerð í Løgtinginum.

### Fíggjarlig stýring

Ein landsfyritøka skal fylgja reglunum um landsins almenna roknskaparhald, eins og løgtingslógin um grannskoðan av almennum roknskapum er galdandi fyri hana. Harumframt kann tað verða lógarásettar serreglur fyri ta einstøku landsfyritøkuna, hvussu roknskapurin skal gerast, og hvør skal grannskoða hann.

### Leiðsla

Ein landsfyritøka er vanliga undir leiðslu av einum stjóra.

### Fyrimunir og vansar við at Apoteksverkið framhaldandi verður skipað sum ein landsfyritøka

Fyri politiska myndugleikan (Løgtingið og avvarandi landsstýrismann) kann tað vera ein fyrimunur, at varðveita apoteksverkið sum landsfyritøku. Tá talan er um landsfyritøkur, hevur politiski myndugleikin møguleika fyri at stýra játtanarkarminum, og er harvið eisini við til at stýra virkseminum. Umframt hetta, hevur avvarðandi landsstýrismaður, sambært verandi reglum, møguleika fyri at tillaga virksemið hjá Apoteksverkinum við prísásetingini av heilivági.

Fyri apoteksverkið kann tað vera ein fyrimunur, at játtanin hvørt einstakt ár kann tillagast tørvinum hjá verkinum. Hetta er serliga galdandi í teimum førum, tá mettu útreiðslurnar eru hægri enn mettu inntøkurnar. Er undirskot ella er tørvur á meirjáttan, er møguleiki fyri at fáa eykajáttan, um landsstýrismaðurin góðkennir tað, og Løgtingið samtykkir hetta. Á henda hátt fær Apoteksverkið møguleika fyri at hava, ella seta í verk virksemi, ið annars ikki var møguleiki fyri.

Hinvegin er tað ein vansi fyri Apoteksverkið, at avlop eitt ár ikki kann sparast upp og nýtast eitt annað ár til eitt nú størri íløgur. Størri útreiðslur í einum ári krevja størri inntøkur í sama fíggjarári.

Stovnar, ið eru á fíggjalóg, eru bundnir av tí politisku skipanini, sum ger tað meira stirvið at handla á vinnuligum grundarlagi. Orsøkin til hetta er, at játtanin er latin teimum eitt ár í senn, og stovnarnir vita ikki fyrr enn við árslok, hvat játtan teir hava at arbeiða við árið eftir. Tað verður tí torført hjá eini fyritøku, ið er at meta sum ein vinnulig fyritøka, at gera ætlanir, seta í gongd virksemi, menna virksemi, og gera íløgur í framtíðar vinnu. Somuleiðis er hetta ein forðan fyri at taka skjótar avgerðir, tá ið møguleikar stinga seg upp.

Sambært § 42 í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um Stýrisskipan Føroya, kann *„lán ella borgan o.a.m, ið skuldbindur løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, (kann) ikki verða tikið ella veitt uttan við heimild í løgtingslóg"*. Hetta merkir, at eitt nú ein landsfyritøka ikki kann upptaka lán uttan serstaka heimild.

Sum meginregla skulu landsstovnar nýta Búskaparskipan Landsins. Fíggjarmálaráðið kann tó loyva stovnum við serligum tørvi heilt ella lutvíst at nýta sínar egnu búskaparskipanir.[26] Tað er tó ein treyt, at stovnar, ið ikki nýta búskaparskipan Landsins, skulu nýta eina búskaparskipan, sum líkur tey kunningar-, trygdar-, eftirlits- og tíðarkrøv, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri Búskaparskipan Landsins. Sambært Føroya Gjaldstovu, so verða landsfyritøkur mettar at vera av slíkum slagi, at hesar kunnu hava egnar búskaparskipanir. Talan er um vinnuligar fyritøkur við til dømis vørusølu, goymslu, innkeypi og kassaterminalum[27].

## 6.3 Uttan fyri fíggjarlóg

Tá talan er um at skipa Apoteksverkið sum „alment virkisøki" uttanfyri løgtingsfíggjarlógina, eru í høvuðsheitum tveir møguleikar, ið eru:

- partafelag, har landið eigur allan partapeningin (alment partafelag)
- almennur stovnur uttan fyri fíggjarlógina, hereftir nevndur sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt.

Teir tveir møguleikarnir verða lýstir niðanfyri.

Ein almennur stovnur, sum verður skipaður uttanfyri løgtingsfíggjarlógina hevur – undir teimum lógarreglum, sum annars eru settar fyri stovnin – frælsi til at virka sum eitt sjálvstøðugt rættarsubjekt.

Í álitinum um landsstovnar og grunnar frá Fíggjarmálaráðnum, ið kom í november 2001 verður ført fram, at tað skulu sera góðar grundgevingar fyri at leggja almennar stovnar uttanfyri løgtingsfíggjarlógina. Sagt verður, at *„delegatión av fíggjarheimild eigur bert at verða givin, tá talan er um ein „sjálvstøðugan" grunn, sum er óheftur av landsstýrinum, og har tað er „natúrligt", at grunnurin hevur ein sjálvstøðugan roknskap og er uttan fyri fíggjarlóg. Neyðugt er, at grunnurin hevur veruliga óhefta støðu, og ikki bert formliga"*[28]. Harumframt verður víst á, at um fíggjarheimild skal delegerast, er avgerandi, at Løgtingið hevur eitt veruligt eftirlit við tí virksemi, ið delegerað verður.

### 6.3.1 Alment partafelag

Tá landið velur at leggja eitthvørt virksemi í eitt partafelag, er hetta á mangan hátt eitt frávik frá teimum stýringsamboðum, sum sermerkja landsfyrisitingina.

Eitt partafelag er ein sjálvstøðugt løgfrøðilig eind. Hetta merkir, at tað eru nevnd og stjóri, sum taka avgerðir um virksemið hjá felagnum, og hvussu t.d. yvirskot skal nýtast. Tað almenna hevur - sum eigari - tær heimildir, sum partaeigarar annars hava í einum partafelagi.

Lógargrundarlagið, sum eitt partafelag skal virka undir, er partafelagslógin, og møgulig serlóg, sum hevur ásetingar um tað virksemi, sum felagið rekur.

Eitt partafelag, har landið eigur allan partapeningin, er sostatt ikki ein partur av tí almennu fyrisitingini, og er vanliga ikki bundið av fyrisitingarlógini, lóg um alment innlit og landsins fíggjarskipan.

Partafelagsformurin er „fremmandur" í almennu fyrisitingini, og skulu tí góðar grundir vera fyri at leggja virksemi hjá landinum í partafelag.

Tann mest týðandi fyritreytin fyri at nýta partafelagsformin er, at virksemið hevur eitt handilsligt grundarlag[29]. Í bóklinginum „staten som aktionær" verður víst á, at:

*„To elementer indgår i vurderingen af, om der er et forretningsmæssigt grundlag:*

1) *De producerede ydelser sælges til slutbrugerne til priser, der afspejler omkostningerne.*
2) *Kvaliteten og omfanget af de producerede ydelser kan tilpasses efterspørgslen."*

Harumframt skulu tey politisku fyrilitini, sum knýta seg til virksemið, kunna ásetast í sektorlóggávu, konsesjón, tænastuavtalum ella líknandi.

*„Kun hvis disse forudsætninger er opfyldt, kan de overordnede formål ved anvendelsen af aktieselskabsformen opnås, dvs.:*

- *En klar måladskillelse, hvor selskabets ledelse – bestyrelse og direktion – kan fokusere på at drive selskabet ud fra forretningsmæssige overvejelser med henblik på at skabe størst mulig værdi, mens de sektorpolitiske hensyn tilgodeses gennem sektorlovgivningen mv. under tilsyn af det relevante ressortministerium og/eller uafhængige tilsynsmyndigheder.*
- *Effektiv udnyttelse af de økonomiske frihedsgrader, der følger af at have*

26 Kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a. § 4, stk. 5,

27 Skriv frá Føroya Gjaldstovu til Fíggjarmálaráðið, dagfest 13.12.2005

28 Álit frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001: „Álit um landsstovnar og –grunnar. Tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti."

29 Finansministeriet, Trafikministeriet og Økonomi- og Erhvervsministeriet: Staten som aktionær, 2004

- *selvstændig formue og aktieselskabslovens styringsmodel frem for det statslige budget- og bevillingssystem.*
- *Inddragelse af den private sektors kompetencer gennem valg af bestyrelsesmedlemmer og rekruttering af direktion og medarbejdere."*

### Fíggjarlig stýring

Eitt partafelag verður vanliga stýrt fíggjarliga við at tað verður gjørd ein árlig fíggjarætlan fyri felagið, umframt mánaðarligir roknskapir. Ársroknskapurin hjá felagnum verður gjørdur sambært ársroknskaparlógini, sum hevur ásetingar um roknskaparviðurskiftini hjá felagnum.

### Leiðsla

Sambært partafelagslógini skal eitt partafelag hava eina nevnd og eina stjórn. Í nevndina skulu veljast minst 3 limir. Í stjórnini skulu – um viðtøkurnar fyri felagið ikki áseta annað – verða 1 til 3 limir.

Partaeigararnir kunnu gera sína ávirkan á felagið galdandi á aðalfundinum. Partaeigari hevur rætt til at taka orðið á aðalfundinum, og hevur atkvøðurætt um tey viðurskifti, sum aðalfundurin tekur avgerð um.

### Fyrimunir og vansar við at Apoteksverkið verður skipað sum partafelag

Partafelagsformurin gevur fíggjarligt frælsi í mun til tað frælsi, sum ein stovnur, sum er á fíggjarlógini, hevur. Endaliga fíggjarliga heimildin liggur hjá leiðslu og nevnd. Felagið hevur eina sjálvstøðuga ogn, sum er atskild frá landskassanum, og lántøka er grundað á kredittvirðið hjá felagnum. Partafelagsformurin gevur Apoteksverkinum størri frælsi at virka, eitt nú tá ið íløgur skulu gerast. Løgtingið skal ikki játtað peningin til íløguna, og harafturat kann avlop flytast til seinni ár.

Løgting og landsstýri hava – umframt við serlóggávu fyri virksemi v.m. - onga ávirkan á felagið, uttan ta ávirkan partafelagslógin gevur partaeigarum. Landskassin ábyrgdast tí bert við eginognini í felagnum, uttan so, at landskassin t.d. hevur borgað fyri lántøku.

Vanliga eiga samfelagsuppgávur ikki at verða álagdar partafeløgum. Sum dømi kann nevnast, at ikki verður álagt eini fyritøku at framleiða ella selja eitt nú heilivág, ið ikki er lønandi.

Verður Apoteksverkið skipað sum partafelag, skal støða takast til býtið millum tað handilsliga virksemi og myndugleikauppgávuna. Talan er um uppgávur sum eitt nú eftirlit við Apoteksverkinum, góðkenning av heilivágsprísum og áseting av neyvari reglum fyri virkseminum hjá Apoteksverkinum. Ein partur av hesum uppgávum liggur nú í Almanna- og Heilsumálaráðnum, meðan ein partur liggur hjá Landsapotekaranum.

Harumframt eru aðrar fyriskipanir, sum støða skal takast til. Her verður serliga hugsa um framleiðslu, veiting og umsiting av heilivági til sjúkrahúsini. Í londunum kring okkum verður henda uppgávan vanliga umsitin av sjúkrahúsapotekum. Hjá okkum verður henda uppgávan umsitin av Apoteksverkinum, tí í Føroyum er einki serstakt sjúkrahúsapotek. Um partafelagsformurin verður valdur, er neyðugt at stovna sjúkrahúsapotek, fyri framhaldandi at trygga veiting av neyðugum heilivági til sjúkrahúsini. Henda veitingartrygdin er ein fortreyt fyri fleiri av viðgerðunum á sjúkrahúsunum.

### 6.3.2 Sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt

Um almennur stovnur skal leggjast uttan fyri fíggjarlóg, hevur hetta í Danmark, í ávísum førum, verið gjørt við at skipa stovnin sum eitt sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt („særligt forvaltningssubjekt/selvstændigt forvaltningssubjekt").

Tað, sum eyðkennir sjálvstøðug fyrisitingarsubjekt er, at tey eru stovnað við almennari fyriskipan, sum meginregla við lóg, sum hevur ásetingar um virksemi, leiðslu, heimild og ábyrgd v.m.

Eitt sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt er ein eind, sum vanliga sambært løgtingslóg røkir ein ávísan part av „tí almennu fyrisitingini", og sum hevur sjálvstøðugar inntøkur og ogn.

Í 1998 varð álit gjørt um almennar grunnar í Danmark[30]. Í hesum áliti verður víst á, at tey sjálvstøðugu fyrisitingarsubjektini eru grunnar, sum mangla tað avgerandi eyðkenni fyri grunnar í løgfrøðiligari merking, nevniliga, at teir eru sjálveigandi. Virksemið í hesum grunnum hevur vanliga „almennan áhuga", sum ofta hava støðið í:

- At rættarsubjektið er stovnað við eini almennari fyriskipan
- At fæið/kapitalurin kemur heilt ella partvíst frá tí almenna
- At rættarsubjektið í stóran mun er bundið av almennum stuðli

Í danska álitinum, sum sipað verður til omanfyri, verður víst á, at *„baggrunden for anvendelsen af særlige forvaltningssubjekter har været et politisk ønske i de konkrete tilfælde om at placere aktiviteten i et selvstændigt retssubjekt adskilt fra den statslige formue og ministerierne kombineret med, at man fortsat har villet bevare den endelige kontrol med det pågældende retssubjekt. Politisk set har man således ved brug af lovgivningen fortsat mulighed for at kunne udøve indflydelse på retssubjektet – herunder nedlægge eller omdanne det til et andet retssubjekt."*

At ein stovnur er eitt sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt merkir sostatt, at landsstýrismaðurin ikki hevur vanligar instruktiónsheimildir mótvegis stovninum. Tó kann landsstýrismaðurin í ávísan mun gera sína ávirkan galdandi við at velja leiðslu og nevnd, hava eftirlit við virkseminum, ella broyta viðtøkur fyri stovnin. Í lógini fyri stovnin eigur at verða ásett, hvørjar heimild og ábyrgd landsstýrismaðurin hevur í mun til stovnin, herundir ásetingar um eftirlit við stovninum.

Sum meginregla kann eitt sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt niðurleggjast, broytast ella einskiljast við lóg. Undir givnum fyritreytum kunnu ognirnar – við virðing fyri triðjamansrættindum – latast aftur til landið, uttan at talan er um ognartøku.

Í lógina fyri tað sjálvstøðuga fyrisitingarsubjektið eigur greitt at verða ásett[31],

- at útreiðslur hjá stovninum ikki skulu takast við í fíggjar- ella játtanarlóg
- at inntøkur ikki skulu takast við í fíggjarlóg
- at talan er um landsstovn, sum er óheftur av beinleiðis ávirkan frá landsstýrinum
- hvørjar avleiðingarnar verða, um delegatiónin verður tikin aftur, serstakliga viðvíkjandi ognini

Hóast raksturin hjá sjálvstøðuga fyrisitingarsubjektinum ikki er við á fíggjarlóg, og ognin verður hildin atskild frá landskassanum, er tað tó at rokna sum landsstovnur, og kemur undir vanligar fyrisitingarligar reglur, tó við teimum undantøkum, sum standast av serligu støðu tess.

30 Finansministeriet, Erhvervsministeriet, Justitsministeriet og Økonomiminsteriet: Fonde med offentlig interesse, 1998

31 Álit frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001: „Álit um landsstovnar og –grunnar. Tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti."

### Fíggjarlig stýring

Í serlógini fyri fyrisitingarsubjekt verður ásett, hvørjar roknskapar- og grannskoðanarreglur eru galdandi fyri stovnin. Vanliga skulu tílíkir stovnar fylgja almennu roknskaparreglunum.

### Leiðsla

Leiðsluviðurskiftini í einum sjálvstøðugum fyrisitingarsubjekti verða ásett í lógini fyri stovnin. Vanliga er talan um eitt stýri og eina stjórn.

Stýrið kann - heilt ella partvíst - verða valt av stovnaranum (landinum).

### Fyrimunir og vansar við at skipa apoteksverkið sum eitt sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt

Tað kann í serlóg fyri fyrisitingarsubjektið ásetast neyvari heimildir og ábyrgdir fyri stovnin. Hetta kann metast at verða ein fyrimunur fyri politiska myndugleikan, tí harvið kann landsstýrið/Løgtingið seta karmarnar, sum stovnurin skal virka undir.

Hinvegin er stovnurin óheftur av landsmyndugleikunum í virki sínum. Ræðisrætturin liggur hjá stýri og stjórn. Tó kann ábyrgdin av myndugleikauppgávum sum eitt nú eftirlit við stovninum, umframt áseting av neyvari reglum fyri virkseminum hjá Apoteksverkinum, ikki delegerast til tað sjálvstøðuga fyrisitingarsubjektið. Ábyrgdin av hesum uppgávum verður hjá landsstýrismanninum.

Ein fyrimunur við at stovnurin ikki er á fíggjarlóg er, at avlop kann flytast til seinni ár. Hetta hevur við sær, at leiðslan fyri stovnin hevur størri frælsi at stýra virkseminum og leggja langtíðarætlanir, enn um stovnurin var á fíggjarlóg.

Ein vansi við at velja sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt í mun til at velja partafelagsformin er, at stovnurin er skipaður við lóg, og at Løgtingið til eina og hvørja tíð kann velja at broyta lógina.

### 6.4 Einskiljing

Almennur stovnur kann eisini leggjast uttanfyri fíggjarlógina sum privat virkisøki. Hetta merkir, at stovnur og virksemi verður einskilt. Ein tílík einskiljing kann fara fram við, at stovnurin sum heild verður einskildur, ella at partar av virkseminum verður einskilt.

Einskiljingin kann fara fram á tann hátt, at stovnurin og/ella virksemið verður latið:

- einum ella fleiri løgfrøðisligum persónum, har landið ikki eigur alt stovnsfæið, til dømis partafeløgum, at reka
- einum ella fleiri likamligum persónum at reka, til dømis farmaceutum.
- partvís løgfrøðiligum persónum, har landið ikki eigur alt stovnsfæið og partvís likamligum persónum at reka

Um Apoteksverkið verður einskilt, verða ásettar treytir fyri at reka apotek. Hesar treytir kunnu vera, at loyvi krevst at reka apotek, og at apotekið er undir leiðslu av farmaseuti. Talan kann eisini verða um, at tað er frítt at seta apotek á stovn, soleiðis sum tað er galdandi í eitt nú Íslandi.

Verður Apoteksverkið einskilt, fær landið inntøkur av søluni. Um einskiljingin verður framd á tann hátt, at loyvi krevst fyri at reka apotek framyvir, er møguleiki at taka loyvisgjald.

Eins og tá talan er um at skipa Apoteksverkið sum alment partafelag, verður neyðugt at flyta myndugleikauppgávurnar til annan at umsita. Í hesum føri má spurningurin um sjúkrahúsapotek eisini viðgerast.

Torført er at meta, um skipanin verður dýrari ella bíligari at reka enn verandi skipan. Mynduleikauppgávur og tann handilsligi parturin, sum nú eru sjálvfíggjandi, skulu undir eini slíkari skipan skiljast sundur. Tá verða inntøkurnar frá søluni at fara á privatar hendur, heldur enn at vera við til at fíggja myndugleikapartin.

### 6.5 Sjálvsognarstovnar/-grunnar

Ein sjálvsognarstovnur/-grunnur er ein sjálvstøðug løgfrøðilig eind, „sum eigur seg sjálvan„, og sum er stovnaður á privatrættarligum grundarlagi. Hetta merkir, at landið ikki eigur grunnin, og kann tí ikki við lóggávu avtaka grunnin ella ráða yvir ognunum, uttan at koma í stríð við ognarrættin hjá grunninum, sum er tryggjaður í grundlógini §73[32].

At talan er um sjálvsognarstovn merkir, at eingin annar uttan stovnurin sjálvur hevur ognarrættin yvir fænum. Í sambandi við avtøku, kann nettoognin bert útgjaldast til tey endamál, sum viðtøkurnar áseta.

Lógargrundarlagið fyri sjálvsognarstovnar er – um talan er um vinnurekandi grunnar – lóggávan um vinnurekandi grunnar. Harumframt verða tílíkir grunnar skipaðir við viðtøkum, sum eisini áseta reglur fyri virkseminum hjá grunninum.

Vísandi til, at bólkurin hevur avmarkað seg til ikki at viðgera sjálvsognarstovnar (grunnaspurningurin, sí 3.4), verður ikki komið nærri inn á tað, sum eyðkennir sjálvsognarstovnar.

Arbeiðsbólkurin metir tó ikki, at tað er skilagott at lata sjálvsognarstovn reka Apoteksverkið, tí grunnaformurin kann hava óhepna ávirkan á tann dynamikk, sum Apoteksverkið eigur at verða opið fyri í framtíðini.

32 Álit frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001: „Álit um landsstovnar og –grunnar. Tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti."



# 7. Umrøða og uppskot at skipa Apoteksverkið í framtíðini

Arbeiðsbólkurin hevur gjøgnumgingið fakligu apoteksskipanir í londunum kring okkum, og hvussu hesar eru skipaðar. Eisini hava vit viðgjørt, hvørjir fíggjarligir leistir eru møguligir at nýta í einum framtíðar Apoteksverki.

Við atliti til at fáa bestu fólkaheilsuna[33] fyri minst møguliga peningaupphædd, støðuga veitingartrygd av heilivági, menningina av heilivágsøkinum og samfelagsbúskaparliga sum heild, umrøða vit í næstum tær ymisku fakligu og fíggjarligu skiparnir undir einum, og koma við uppskoti til loysn at skipa framtíðar Apoteksverk.

Av teimum skipanum, sum arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt, eru ongar Apoteksskipanir heilt samanberligar, tá talan er um bæði tann fíggjarliga og fakliga partin, sæð undir einum.

Tann føroyska skipanin líkist fakliga mest tí svensku skipanini. Í bæði Føroyum og Svøríki hevur Apoteksverkið einkarætt at selja heilivág. Í Føroyum hevur Apoteksverkið harumframt einkarætt til at innflyta heilivág.

Bæði í Føroyum og Svøríki eru apotekini tætt knýtt at heilsuøkinum. Í Svøríki eigur staturin partabrøvini í Apoteket AB, meðan tað í Føroyum er landið, sum er eigari av Apoteksverkinum. Í Føroyum hava myndugleikarnir møguleika at útinna ymsar fólkaheilsutænastur um apotekini, eitt nú málingar av blóðtrýsti og kolesteroli í blóðinum, umframt temadagar um heilsu og heilivág v.m. Í Svøríki er hetta ein samráðingarspurningur millum svensku myndugleikarnar og Apoteket AB.

Sum nevnt undir 5.3, so hava liberaliseraðu skipanirnar í Íslandi og Noregi ikki livað upp ta kapping, ið roknað varð við, við tað at fáar og stórar heilivágsheilsølur eiga ein stóran part av apotekunum. Hetta hevur millum annað ført við sær, at heldur enn at deregulera marknaðin, eru fleiri reguleringar settar í verk av myndugleikunum.

Tann bretski marknaðurin er munandi størri enn marknaðirnir í norðurlondum. Eftir okkara tykki er tann bretska skipanin sera áhugaverd, tí har tykjast marknaðarkreftirnar at virka til fulnar undir skipaðum viðurskiftum. Hetta kundi bent á, at tað skal ein ávís marknaðarstødd til, áðrenn verulig kapping hevur livilíkindi. Føroyski marknaðurin er helst ov lítil til hesa skipan.

Í Íslandi eru prísirnir á heilivági hægri enn í Føroyum. Tað tykist sum tað í Íslandi er trupult at útvega bíligan generiskan heilivág[34], sum finst á marknaðunum í grannalondunum, eisini í Føroyum. Orsøkin til hetta er, at privatu heilivágsfyritøkurnar heldur vilja selja dýrari sløg av heilivági, tí tær hava størri vinning av hesum[35].

Arbeiðsbólkurin er av tí sannføring, at føroyska Apoteksverkið ikki egnar seg til einskilјing[36]. Royndirnar í Íslandi og Noregi vísa eftir okkara tykki, at marknaðurin er ov lítil til eina privata skipan, sum verulig kapping er í. Sæð út frá einum fólkaheilsuligum sjónarhorni, vildi ein liberalisering ella einskilјing havt við sær eina minni støðuga og minni liðiliga skipan enn hana, vit hava nú.

Hinvegin kundi møguliga nakrar av uppgávunum, sum nú liggja í Apoteksverkinum, einskiljast. Hetta eru uppgávur, sum ikki hava tann stóra týdningin fyri heilsuverkið, men sum kunnu hava týdning fyri framtíðar vinnumøguleikar í Føroyum. Sum dømi um hetta kann nevnast framleiðsla av heilivágsfóðri til útflutnings.

Um tablettframleiðslan í Føroyum verður ment, serliga við atliti til generiskan heilivág, er ikki óhugsandi, at ein lønandi vinna kann spyrjast burtur úr. Hugsa eigur at verða um framleiðslu við útflutningi fyri eyga, sum seinni kann einskiljast.

Umframt at varðveita fakliga bygnaðin, við teimum broytingum, sum greitt frá í 8. parti um heilivágsætlan fyri Føroyar, verður mælt til, at Apoteksverkið verður skipað fíggjarliga sum eitt sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt. Hetta fer at geva meiri fleksibilitet í fíggjarligu stýringini, og Apoteksverkið fær gagn av avlopinum. Tað avlop, sum verður flutt frá einum ári til tað næsta, kann nýtast til rakstурin av Apoteksverkinum og til íløgur, innan tann karm, sum verandi løgtingslóg um apoteksverk og heilivág við neyðugum broytingum, ella ein nýggj løgtingslóg um apoteksverkið setur.

Í næsta parti er orðað uppskot um heilivágsætlan fyri Føroyar. Hetta uppskot er grundað á, at ein menning fer fram av núverandi apoteksskipan, men kortini ikki ein víðgongd broyting av skipanini.




33 Fólkaheilsa er ‚vísundi og kynstrið at fyribyrgja sjúku, leinga um lív, og fremja heilsuna gjøgnum skipaði átøk og avgerðir hjá samfelagi, felagsskapum, almenningi og einstaklingum' Wanless 2004

34 Generiskur heilivágur hevur sama virkna innihaldsevni, sum upprunaligi heilivágurin. Sum dømi kann nevnast heilivágurin Losec fyri magasár, sum fyritøkan Astra marknaðarførdi. Virkna innihaldsevni í Losec er omeprazol. Nú finst omeprazol sum generiskur heilivágur, eitt nú undir handilsnavninum Lomex.

35 www.landlaeknir.is/template1.asp?pageid=628&nid=795

36 Tá einskilјing verður umtalað í hesum partinum (7), verður eisini sipað til partafelag, har tað almenna eigur allan partapeningin.

# 8. Uppskot um heilivágsætlan fyri Føroyar fram til 2015

Europadeildin hjá heimsheilsustovninum, WHO, hevur gjørt eina høvuðsætlan fyri heilsu í 21. øld: "Heilsa fyri øll í 21. øld". Eitt av aðalmálunum við ætlanini er til fulnar at útvega øllum heilsumøguleikar. Endamálið við hesum er:

- At fremja og verja heilsuna hjá fólki fyri alt lívið
- At tálma smittuvandanum av ringastu sjúkunum, fyribyrgja skaðatilburðum og lætta um líðingar, ið sjúkur og skaðatilburðir elva til.

WHO mælir øllum tjóðum til at gera eina landsheilivágsætlan, fylgja henni og dagføra hana.[37]

Langtíðarætlanin hjá WHO er at bjarga mannalívum og at betra um heilsustøðuna hjá fólki við at tryggja dygd, trygd og virkan av heilivági og skynsamuligari nýtslu, hetta serliga hjá teimum fátæku og brekaðu.

Heilivágsætlanin fyri Føroyar er grundað á:

- føroyska siðvenju og lóggávu um heilivág

37 WHO Medicine Strategy 2004-2007: Countries at the core

- Apoteksverkið og heilsuøkið við atliti til aðalmál WHO's viðvíkjandi heilsu og heilivági
- fólkaheilsupolitikkin fyri Føroyar, sum lýst í Visjón 2015 hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum.

Síðani 1949 hevur heilivágsøkið í Føroyum verið ein týðandi partur av heilsuverkinum. Tær skipanir og siðvenjur, sum gjøgnum tíðina eru mentar í stýringini av Apoteksverkinum, hava givið góðar, tryggar og álítandi tænastuveitingar. Tí verður í heilivágsætlanini fram til 2015 dentur lagdur á, at menna verandi skipan, heldur enn at gera víðgongdar broytingar.

Umframt áhaldandi at leggja dent á fyribyrging og sjúkuviðgerð, er stabil og javnbjóðis atgongd til heilsutænastur høgt raðfest.

### Heilivágsætlan 2015

Heilivágsætlanin er býtt sundur í trý stevnumið:

- At tryggja atgeingi til neyðugan heilivág
- At tryggja góðsku og trygd á heilivági og tænastum
- At tryggja skilagóða og skynsama nýtslu av heilivági

## Apoteksverkið – Visjón 2015






## Atgeingi til neyðugan heilivág

Atgeingi til heilivág veldst um ymisk viðurskifti, eitt nú hvussu nógvir kommunulæknar eru á staðnum, um langt er til apotek, siðvenja at taka heilivág og fíggjarligar umstøður. Heilivágur kann fækka sjúkutíttleikan, linna líðingar og pínu og betra um lívsmøguleikar og lívsgóðsku. Røtt og skynsamilig nýtsla av heilivági kann minka um útreiðslurnar á sjúkraøkinum við færri innleggingum á sjúkrahúsini og tískil færri sjúkradøgum. Skeiv nýtsla av heilivági kann harafturímóti hava við sær tilfeingisspill og útreiðslur, vera vandamikil og kann í ringasta føri hava við, at sjúklingurin doyr.

Hinvegin hevur heilivágur eisini hjáárin, og tí er viðgerð við heilivági altíð ein læknalig meting, har eitt nú atlit verða tikin fyri hvussu álvarsom hjáárini kunnu verða í mun til ætlaða virkanina av heilivágnum.

Endamálið hjá Apoteksverkinum er at útvega tann rætta heilivágin til tann rætta persónin, í rættari tíð, í røttum líki, við rættari dygd og neyðugari kunning um hvussu heilivágurin skal nýtast.

Sum almennur stovnur hevur Apoteksverkið ábyrgdina av at veita heilivág og tænastur so ódýrar sum til ber til allar borgarar í Føroyum. Fólk gjalda sama prís fyri heilivág, uttan mun til, hvar tey búgva.

Viðvíkjandi framtíðini verður mett, at neyðugt er at víðka virksemið við einum apoteki ella apoteksdeild afturat í Tórshavn. Umframt hetta verður neyðugt at útbyggja apoteksavgreiðsluna á Landssjúkrahúsinum, og upp á longri sikt at hava eitt veruligt sjúkrahúsapotek. Arbeiðstrýstið á Tjaldurs apotek í Tórshavn er stórt, og fakliga verður ikki mett, at hetta í longdini er nøktandi, hvørki fyri viðskiftafólk ella starvsfólk.

Neyðugt er at gera eina nýggja framleiðsludeild sum lýkur GMP-krøv[38], tí verandi framleiðsludeild á Tjaldurs apoteki livur ikki upp til verandi krøv.

Samstundis verður mælt til at kanna møguleikarnar fyri at menna og framleiða generiskan heilivág til útflutnings, í mun til um patent er tikið í Føroyum uppá tey sløgini av heilivági, sum ætlanin er at framleiða. Hetta kann møguliga gerast í samstarvi við eitt útlendskt virki.

Demografiska broytingin, har ein alsamt vaksandi partur av fólkinum eru væl við aldur, er ein avbjóðing fyri samfelag. At fólk liva longri hevur við sær, at útreiðslurnar til heilivág fyri samfelagið økjast ár um ár. Útreiðslurnar til heilivág hjá tí einstaka persóninum økjast við aldrinum, og eru størstar tey seinastu fimm liviárini[39]. Útreiðslurnar eiga kortini ikki at forða sjúklingum atgongd til neyðugan heilivág. Neyðugt er tí, at tað framhaldandi eru skipanir, sum tryggja javna og javnsetta atgongd til heilivág, og at útreiðslurnar ikki gerast ov stórar fyri einstaklingin. Samstundis er neyðugt at tryggja skynsama nýtslu av heilivági til tess at varðveita og menna dygdina hjá heilsutænastuni, og avmarka útreiðslurnar hjá tí almenna. Í tí sambandi eigur tilvitskan hjá læknum og brúkarum um heilivágsprísir at styrkjast.

Vísindaliga og tøkniliga menningin hevur havt við sær stór frambrot innan heilsu og heilsurøkt, ikki minst við menning av nógvum nýggjum heilivági. Áðrenn nýggjur heilivágur verður tikin í nýtslu, er neyðugt at meta um virknað og kostnað av heilivágnum, í mun til verandi og betur kendar viðgerðir.

38 GMP: Good Manufacturing Practice ( ‚góður framleiðsluháttur'), er góðskukervi fyri framleiðslu av heilivági. Kravt verður av heilivágsframleiðarum, at teir fylgja GMP-reglunum.

39 Sí fylgiskjal við yvirliti yvir heilvágsbrúk býtt í aldurbólkar

## At tryggja atgeingi til neyðugan heilivág

- Apoteksverkið útvegar rætta heilivágin til rætta persónin til rætta tíð í røttum líki, við rættari góðsku og við rættari og neyðugari kunning.
- Apoteksverkið hevur týðandi lut í fyribyrgjandi og fólkaheilsuligum tænastum til borgararnar.
- Framleiðslan av heilivági er ment og framleitt verður bæði til heimamarknað og til útflutnings.
- Føroyar eru við í norðurlenskum samstarvi um innkeyp/útboð av heilivági.
- Læknar og brúkarir hava greiða fatan av prísi á heilivági.
- 5-6 apotek eru í Føroyum, íroknað eitt sjúkrahúsapotek.

## Góðska og trygd á heilivági og tænastum

Heilivágur er gjølliga reglustýrdur av lógum, kunngerðum og leiðbeiningum, sum í minstu smálutum gera av, hvat heilivágur er, hvussu hann eigur at verða framleiddur, hvør skal gera arbeiðið, og hvussu heilivágurin skal útflýggjast og handfarast.

Til tess at tryggja rætta og skynsama heilivágsnýtslu er neyðugt at lógir, kunngerðir og kliniskar leiðbeiningar verða hildnar, og at myndugleikarnir hava eftirlit við hesum øki og brúki.

Føroyska heilivágslógin og kunngerðirnar eru grundaðar á danska heilivágslóggávu. Hesi seinnu árini eru gjørdar fleiri broytingar í donsku heiligvágslóggávuni. Tað kemst serliga av EU-fyriskipanum á heilivágsøkinum. Hesar broytingar eru ikki, í sama mun, tiknar við í føroysku lóggávuni, hóast fleiri teirra hóska væl til føroysk viðurskifti. Neyðugt er at kanna heilivágslóggávuni í londunum kring okkum við atliti at dagføring av føroysku heilivágslóggávuni.

Serliga við denti á greiðum allýsingum av heilivági og øðrum týdningarmiklum hugtøkum innan heilivágsøkið.

Skeiv heilivágsnýtsla er nú ein tann største trupulleikin, sum londini hava at dragast við. Sambært WHO[40] taka 50% av teimum, sum eru í langtíðarviðgerð við heilivági, skeivan heilivág, brúka heilivágin skeivt ella taka als ikki heilivágin. Mett verður, at 5-10% av øllum innleggingum á sjúkrahús eru orsaka av skeivari heilivágsnýtslu. Í Noregi verður mett, at skeiv heilivágsnýtsla kostar norska heilsuverkinum um 5 milliardir norskar krónur um árið. Er sama støðan galdandi í Føroyum, eru eykaútreiðslurnar hjá heilsuverkininum, orsaka av skeivari heilivágsnýtslu, einar 50 miljónir krónum.

Serliga tey eldru eru í vanda, tá talan er um at brúka heilivágin skeivt. Trupulleikin er, at tey brúka nógv ymisk sløg av heilivági, og at tey eru í viðgerð av ymiskum læknum.

Til tess at tálma skeivari heilivágsnýtslu, verður mælt til felags átøk innan heilsuøkið. Sum dømi kunnu nevnast elektroniskur heilivágsprofilur[41] fyri brúkarar, reglur og leiðbeiningar um, hvussu heilivágsprofilurin verður kannaður, tá sjúklingar verða innskrivaðir og útskrivaðir á sjúkrahús, reglur um skamtluting[42] av heilivági og kunning um heilivágin. Mælt verður til, at átøk fyri at fyribyrgja skeivari nýtslu av heilivági verða savnað í kunngerð.

40 „Adherence to long tern therapies – Evidence for action" WHO 2003

41 Elektroniskur heilivágsprofilur merkir, at allur heilivágur, ið ein persónur fær, er skrásettur í einum dátugrunni, so til ber at gera eina heildarmetan heilivágsviðgerðini, serliga við atliti til hjáárin, og at ymiskar heilivágir ikki sampakka.

42 Skamtluting merkir, at tey heilivágssløgini, sum ein sjúklingur tekur, verður pakkaði í pakkimaskinu í skamtir. Vanliga verður pakkað í plastposar til ein mánað ísenn. Á plastposunum, sum hanga saman, er tilskilað, nær innihaldið í hvørjum posa sær skal takast.

**At stuðla undir trygd, góðsku og virkan av heilivági og -tænastum:**

- Lóggávan um heilivág er dagførd.
- Kunngerðir eru endurskoðaðar.
- Nýggj kunngerð er gjørd um at seta í verk atgerðir fyri at fyribyrgja skeivari nýtslu av heilivági
- Apoteksverkið er ein vitanardepul um heilivág („Drug/poision information center").
- Apoteksverkið hevur eftirlit við innflutningi og nýtslu av forevnum (precursors)[43].
- Apoteksverkið skrásetir hjáárin og samstarvar við WHO´s Collaborating Centre for International Drug Monitoring í Uppsala.
- Landsapotekaembætið/apotekini hava regluligt eftirlit við apotekum, sjúkrahúsum, røktarheimum og øðrum støðum, har heilivágur verður handfarin.
- Apoteksverkið er undir eftirliti av Almanna- og Heilsumálaráðnum.

43 Forevni ella precursors merkir í hesum sambandi evni, ið brúkt kunnu verða í víðari framleiðslu av skaðiligum og vandamiklum evnum, eitt nú rúseitur og spreingievni.



**Skilagóð og skynsom nýtsla av heilivági**

Skynsom heilivágsnýtsla kann allýsast sum tann heilivágsviðgerð, ið gevur:

- bestu ávirkan
- við so fáum álvarsomum hjáárinum sum gjørligt
- fyri minst møguligan viðgerðar kostnað

Heilsuøkið skal stuðla skynsama nýtslu av tí heilivági, ið er til taks, bæði út frá virknað og samfelagsbúskaparligum sjónarmiðum. Hetta merkir, at bíligasti heilivágur skal veljast í teimum førum, har árin og hjáárin av fleiri heilivágssløgum ikki eru munandi ymisk.

WHO og aðrir altjóða felagsskapir hava ment mannagongdir, fyri at tálma heilivágsútreiðslunum, og røkka einari skynsamari heilivágsnýtslu. Hetta verður undir einum nevnt „Evidence based medicin", og fevnir millum annað um kliniskar leiðbeiningar, heilivágsnevndararbeiði og menning av viðmælislistum til heilivág, ið stuðla undir skynsomum brúki av heilivági.

Apoteksverkið hevur ein alt størri lut í heilsuverkinum, við at framleiða hagtøl um heiligvágsnýtslu, ið er grundarlagið undir teimum tiltøkum, sum eru við til at avmarka heiligvágsútreiðslurnar.

**At tryggja skilagóða og skynsama nýtslu av heilivági (rationel farmakoterapi)**

- Viðgerðin av sjúklingum við heilvági í Føroyum fer fram á ein læknafakligan, farmaseutiskan og fíggjarliga skynsaman hátt.
- Nýtslan av heilivági í øllum viðgerðarliðum er skilagóð.
- Apoteksverkið samstarvar við granskarar, og er við til at birta uppundir nýggjar granskingarverkætlanir, fyri at menna tað ástøðiliga grundarlagið fyri praktiskari nýtslu av heilivági.
- Apoteksverkið er við til at gera metingar um tað er skynsamt samfelagsbúskaparliga at geva almennan stuðul til ávísan heilivág.
- Fakliga grundarlagið undir apoteksverkinum, førleikin hjá starvsfólkinum og innanhýsis bygnaðurin eru styrkt.
- Færri enn 5% av innleggingum á sjúkrahúsunum eru orsaka av skeivari nýtslu av heilivági.
- Minst 80% af teimum sjúklingunum, sum kunnu hava gagn av skamtluting av heilivági, fáa heilivágin á henda hátt.
- Landsapotekarin ger hagtøl yvir nýtsluna av heilivági.
- Heilivágsnevnd ger, og heldur árliga við líka, eina ætlan fyri nýtslu av heilivági. Harumframt ger og viðlíkaheldur heilivágsnevndin ein heilivágstilmælislista, í samstarvi við yvirlæknar og aðrar serfrøðingar.
- Landsapotekarin samskipar, í samstarvi við læknastjóran og heilivágsnevndina, keyp og goymslu av heilivági. Hetta verður gjørt við støði í heilivágshagtølum og heilivágsviðmælislistanum.
- Kliniskir farmaceutar eru knýttir at einum nýggjum sjúkrahúsapoteki á Landssjúkrahúsinum. Landsapotekarin hevur ábyrgdina av sjúkrahúsapotekinum.
- Virksemið hjá apoteksverkinum verður regluliga eftirmett, við tí fyri eygað at gera møguliga broytingar.



# 9. Tilmæli

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er týdningarmikið at verja kjarnuna í núverandi apoteksskipanini. Her verður hugsað um teir tríggjar grundarsteinarnar, sum nevndir verða í parti 8, nevniliga at tryggja atgeingi til neyðugan heilivág, at tryggja góðsku og trygd á heilivági og tænastum, og at tryggja skilagóða og skynsama nýtslu av heilivági.

Umframt hetta er neyðugt at menna apoteksskipanina, í mun til heilivágsætlanina 2015, somuleiðis lýst í parti 8.

Arbeiðsbólkurin metir ikki, at tað er skilagott at gera so víðgongda broyting av apoteksverkinum, sum einskiljing er. Hinvegin metir arbeiðsbólkurin, at tað er skilagott, sum frá líður, at vera opin fyri at einskilja tann partin av framleiðsluvirkseminum, sum hevur møguleika at klára seg á privata marknaðinum. Tann parturin, sum hevur við veitingartrygd til heilsuverkið at gera, eigur framvegis at vera almennur.

Arbeiðsbólkurin metir heldur ikki, at tað er skilagott at lata sjálvsognarstovn reka Apoteksverkið, tí grunnaformurin kann hava óhepna ávirkan á tann dynamikk, sum Apoteksverkið eigur at verða opið fyri í framtíðini.

Arbeiðsbólkurin metir somuleiðis, at lítil ivi er um, at samskiftið við hinar partarnar í heilsuverkinum, sosial atlit og almenna eftirlitið við góðskuni av hesum tænastum verða best røkt í eini almennari skipan.

Arbeiðsbólkurin mælir tí til, at Apoteksverkið verður skipað sum eitt sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt. Hetta ber við sær, at lógarásetingar skulu gerast fyri Apoteksverkið, við neyvum heimildum og ábyrgdum fyri stovnin. Hetta kann gerast við broytingum í verandi løgtingslóg, ella um neyðugt við nýggjari serlóg.

Harumframt skal ásetast í løgtingslógini, at stovnurin, herundir inntøkur og útreiðslur hjá honum, ikki verður tikin við á løgtingsins fíggjarlóg, umframt hvørjar reglur eru galdandi um roknskap og grannskoðan. Støða skal takast til, hvørjar ásetingar skulu gerast um ávísar almennrættarligar reglur, sum galda fyri fyritøkur, sum eru á fíggjarlógini. Talan er millum annað um almennar lønarsáttmálar, sjálvtryggingarskipanir, og um fyrisitingarlóg og lóg um alment innlit.

Umframt hetta, mugu reglur ásetast um myndugleikauppgávurnar, og ábyrgdina av uppgávunum.

Arbeiðsbólkurin metir tað verða av stórum týdningi at materiella løggávan fyri Apoteksverkið og fíggjarliga skipanin av verkinum eru samsvarandi. Hetta verður ikki mett at verða støðan nú. Sambært løgtingslógini um apoteksverk og heilivág fellur avlopið frá apoteksrakstrinum til apoteksgrunnin, sum hevur til endamáls at fíggja Apoteksverkið, men Apoteksverkið er á fíggjarlógini sum landsfyritøka, og merkir hetta at avlop ikki kann sparast upp í apoteksgrunnin.

Mælt verður tí sum eitt tað fyrsta at gera neyðugu broytingarnar í materiellu løggávuni fyri Apoteksverki, soleiðis at Apoteksverkið verður skipað sum eitt fyrisitingarsubjekt.

Sum nevnt undir 4.2.1, so er tann parturin av umsetninginum hjá apotekunum, sum umfatar vørur í fullari kapping, so lítil, at vit meta ikki at neyðugt er at gera serligar roknskaparligar reglur fyri henda partin av søluni. Hinvegin eigur landsstýrismaðurin at tryggja sær, at Apoteksverkið heldur seg innan fyri rímiligt mark, samsvarandi § 16 í galdandi løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág. Mælt verður til, at hetta verður gjørt við dagføring av verandi løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág ella í nýggjari lóg um apoteksverkið og heilivág, antin beinleiðis í lógini ella í kunngerð við heimild í lógini.

Sum nevnt í parti 8 verður harumframt mett neyðugt at dagføra heilivágsløggávuna, serliga við denti á, at gera greiðar allýsingar av heilivági og øðrum týdningarmiklum hugtøkum innan heilivágsøkið.

Í fylgiskjali nr. 3 er uppskot til tíðarætlan fyri arbeiðinum at seta í verk heilivágsætlan og gera lógarbroytingar við meiri.

Mett verður, at fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið av hesum tilráðingum verður avmarkað. Talan verður um at avvarðandi aðalráð, nú Almanna- og Heilsumálaráðið, fær álagt eina eyka eftirlitsuppgávu, og skal í hesum sambandi hava arbeiðsorku til hetta arbeiði. Apoteksverkið hevur sítt egna innaneftirlit, og tí verður ikki mett, at eftirlitsuppgávan verður so umfatandi.

Umsitingarligar avleiðingar av tilráðingunum eru í høvuðsheitum at orka skal nýtast til at dagføra verandi lóg um apoteksverk og heilivág, ella at gera eitt nýtt lógaruppskot. Umsitingarliga orkan skal eisini nýtast til at gera tær kunngerðir og annað, ið uppskot til heilivágsætlan mælir til, sambært tíðarætlan í fylgiskjali 3.

Mælt verður til at orka verður nýtt, í verandi ári, til at gera lógarbroytingar, soleiðis at Apoteksverkið verðyr skipað sum eitt fyrisitingarsubjekt.

Arbeiðsbólkurin mælir harumframt til, at farið verið sum skjótast undir at endurskoða prísásetingina á heilivági og tilskotsskipanina til heilivág. Hetta hevur sera stóran týdning, tá tosað verður um heilivágsnýtslu. Hetta er ikki ein partur av arbeiðssetninginum hjá arbeiðsbólkinum, og er tí ikki viðgjørt í hesum álitinum.



# 10. Skjalalisti

Álit frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001: „Álit um landsstovnar og –grunnar. Tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti".

Løgtingsfíggjarlóg fyri 2006, játtanarskipanin.

Finansministeriet, Erhvervsministeriet, Justitsministeriet og Økonomiministeriet: Fonde med offentlig interesse, 1998

Finansministeriet, Trafikministeriet og Økonomi- og Erhvervsministeriet: Staten som aktionær, 2004

Árni Dahl: ‚Er tað nakað grøðandi?', Apoteksverkið, Tórshavn 1999

HVÍTABÓK – FYLGIBIND 2 – FYRISITING – ein sjálvstøðug føroysk fyrisiting – 1999 Føroya Landsstýri).

Álit um játtanarskipan landsins frá 24. februar 2006 (løgtingsmál nr. 81/2005).

# 11. Fylgiskjøl

**Fylgiskjal I**

**Nýtsla av heilivági í 2003, sum fær vanligt tilskot (í Føroyum sjúkrakassatilskot) frá tí almenna, býtt eftir aldri og kyn. DDD/1000 íbúgvar/samdøgur**

| | Danmark | | Føroyar | | Finnland | | Ísland | | Svøríki | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Menn | Kvinnur | Menn | Kvinnur | Menn | Kvinnur | Menn | Kvinnur | Menn | Kvinnur |
| **0-14 ár** | 69,6 | 54,9 | 19,2 | 19,4 | 72,6 | 55,8 | 107,1 | 77,2 | 214,2 | 199,49 |
| **15-24 ár** | 109,7 | 149,0 | 39,0 | 143,2 | 128,7 | 185,6 | 162,1 | 651,2 | 203,1 | 797,79 |
| **25-44 ár** | 262,7 | 332,7 | 77,4 | 546,5 | 300,9 | 369,8 | 343,4 | 859,9 | 393,4 | 825,66 |
| **45-64 ár** | 995,2 | 1202,3 | 337,7 | 442,9 | 1035,7 | 1275,7 | 1230,9 | 1909,3 | 1379,7 | 1803,58 |
| **65-74 ár** | 2217,1 | 2308,6 | 857,1 | 783,7 | 2195,9 | 2253,8 | 2905,9 | 3264,2 | 2969,1 | 2996,24 |
| **75+ ár** | 2973,8 | 3101,4 | 1277,6 | 1286,1 | 2791,2 | 2875,7 | 3226,0 | 3081,9 | 4296,9 | 4371,88 |

Hvør heilivágur verður lýstur við einum ásettum samdøgursskamti (DDD: Defined Daily Dose). Eindin, ið nýtt verður er DDD/1000 íbúgvar/samdøgur. Um hetta talið er eitt nú 29, so merkir tað, at av hvørjum 1000 fólkum taka 29 fólk heilivágin hvønn dag.

**Fylgiskjal II**

**Heilivágsnýtsla býtt eftir heilivágsbólkum 2003 (ásettir samdøgursskamtir) (DDD)/1000 íbúgvar/samdøgur)**

| | Danmark | Føroyar | Grønland | Finnland | Áland | Ísland | Noreg | Svøríki |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **A Sodningarlag og evnisbroyting** | 131 | 124 | 57 | 173 | 148 | 115 | 185 | 195 |
| **B Blóð og blóðgerðargøgn** | 78 | 559 | 26 | 127 | 127 | 81 | 103 | 117 |
| **C Hjarta og blóðrensl** | 320 | 390 | 132 | 381 | 308 | 307 | 352 | 353 |
| **G Landrás og kynsgøgn umframt kynshormonir** | 108 | 85 | 65 | 128 | 112 | 142 | 99 | 113 |
| **H Hormon, onnur enn kynshormon** | 27 | 24 | 11 | 36 | 43 | 29 | 36 | 38 |
| **J Heilivágur fyri ígerðarsjúkur** | 16 | 19 | 25 | 24 | 22 | 21 | 18 | 18 |
| **L Heilivágur fyri krabbasjúkur og órinslagið** | 6 | 4 | 1 | 9 | 12 | 7 | 7 | 8 |
| **M Vøddar og liðir** | 49 | 38 | 27 | 86 | 61 | 76 | 61 | 61 |
| **N *Nervalagið*** | 236 | 171 | 97 | 210 | 148 | 273 | 190 | 234 |
| **P Heilivágur fyri snultarar, skorðdraeitur of firringarevni** | 1 | 1 | 2 | 1 | 2 | 1 | 1 | 1 |
| **R Andingargøgn** | 116 | 83 | 50 | 119 | 106 | 103 | 161 | 136 |
| **S Heilivágur fyri eygu og oyru** | 8 | 6 | 13 | 13 | 13 | 10 | 17 | 15 |
| ***Samlað*** | 1096 | 1004 | 507 | 1311 | 1104 | 1171 | 1230 | 1535 |

Tølini eru samanberilig, tí at heilivágsbrúkið fyri hvønn heilivágsbólk (A, B, C osfr) verður roknað sum tal av ásettum skamtum fyri 1000 íbúgvar fyri hvørt samdøgur, Hvør heilivágur ver›ur lýstur við einum ásettum samdøgursskamti (DDD: Defined Daily Dose). Eindin, ið nýtt verður er DDD/1000 íbúgvar/samdøgur. Um hetta talið er eitt nú 29, so merkir tað, at av hvørjum 1000 fólkum taka 29 fólk heilivágin hvønn dag.

Fylgiskjal III

# Tíðarætlan

VIRKISÆTLAN TIL 2015

2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 (1 2 3 4 per year)

## ATGEINGI TIL NEYÐUGAN HEILIVÁG

**5-6 apotek í Føroyum**

**Apoteksverkið hevur týðandi lut í fyribyrgjandi og fólkaheilsuligum tænastum til borgararnar**

**Framleiðsludeildin av heilivági flutt til Staraveg 15 í Tórshavn**

**Møguleikar fyri heilivágsútflutningi kannaðir**

**Við í norðurlendskum samstarvi um innkeyp/útboð av heilivági**

**Læknar og brúkarir hava greiða fatan av prísi um heilivági**

## GÓÐSKU OG TRYGD Á HEILIVÁGI OG TÆNASTUM

**Lóggávan um heilivág er dagførd við neyvari lýsing av hugtøkum um heilivág**

**Kunngerðir eru endurskoðaðar**

**Nýggj kunngerð er gjørd um at seta í verk atgerðir fyri at fyribyrgja skeivari nýtslu av heilivági**

**Apoteksverkið er ein vitanardepul um heilivág ("Drug/poision information center")**

**Apoteksverkið hevur eftirlit við innflutningi og nýtslu av forevnum (precursors)**

**Apoteksverkið skrásetir hjáárin og samstarvar við WHO´s Collaborating Centre for**

**Landsapotekaembætið/apotekini hava eftirlit við apotekum, sjúkrahúsum o.ø., har heilivágur verður handfarin**

## SKYNSOM NÝTSLU AV HEILIVÁGI

**Viðgerðin av sjúklingum við heilvági fer fram á læknafakligan, farmaseutiskan og fíggjarliga skynsaman hátt**

**Miðvíst kunningararbeiði fyri at broyta hugburðin til skilagóða nýslu av heilivágið**

**Nýtslan av heilivági í øllum viðgerðarliðum er skynsom**

**Apoteksverkið er við til at meta um at geva almennan stuðul til ávísan heilivág**

**Fakliga grundarlagið undir Apoteksverkinum, førleikin hjá starvsfólkinum og innanhýsis bygnaðurin eru styrkt**

**Færri enn 5% av innleggingum á sjúkrahúsunum eru orsaka av skeivari nýtslu av heilvági**

**Minst 80% af teimum sjúklingunum, sum kunnu hava gagn av skamtluting av heilivági, fáa heilivágin á henda hátt**

**Heilvágsnevnd ger og heldur við líka heilivágstilmælislista í samstarvi við yvirlæknar og aðrar serfrøðingar**

**Landsapotekarin samskipar, í samstarvi við læknastjóran og heilivágsnevndina, keyp og goymslu av heilivági**

**Kliniskir farmaceutar eru knýttir at einum nýggjum sjúkrahúsapoteki á Landssjúkrahúsinum**

**Virksemið hjá Apoteksverkinum verður regluliga eftirmett, við tí fyri eygað at gera møguliga broytingar**

Landsapotekarin
Apoteksverkið
Tjaldurs apotek
Almanna- og heilsumálaráðið
Landsjúkrahúsið

# Viðmerkingar

# Viðmerkingar

# Viðmerkingar

# Viðmerkingar

# Viðmerkingar